| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>14. desember 2017 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 14. desember 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 288/17 – 320/17**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Bjørg Dam
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Sigurð Ó. Vang
Lars Black
David Andrésen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 288/17 | 17/01364-11 | Helena Dam á Neystabø: farloyvi frá býráðnum | 4 |
| 289/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 5 |
| 290/17 | 17/03044-2 | Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2016 hjá Westward Ho | 7 |
| 291/17 | 14/01389-16 | Útstykking Kaldbak - sølustøða. | 9 |
| 292/17 | 15/02098-2 | Umsókn um góðkenning av søluavtalu millum TF Ognir og Gist & Vist | 17 |
| 293/17 | 15/01750-53 | Uppskot til semju um læknahølini í Kollafirði | 19 |
| 294/17 | 17/00345-2 | Keyp av lendi til Á-handil við Landavegin | 21 |
| 295/17 | 17/02940-2 | Umsókn um keyp av øki at leggja afturat matr. nr. 185c, Tórshavn | 23 |
| 296/17 | 17/03875-1 | Umskipan av kloakk frá Óðinshædd til Boðaneshamar | 25 |
| 297/17 | 14/01352-11 | Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015 | 27 |
| 298/17 | 14/01987-3 | Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv á Argjum - Argir Bakkagøta og Argjaboða, smb. spillivatnsætlan | 32 |
| 299/17 | 16/04347-1 | Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum | 35 |
| 300/17 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 37 |
| 301/17 | 14/03818-2 | SP/f Protek : Umsókn vegna Gullak Madsen um útstykking av matr. nr. 1216a, Tórshavn (2010-2022) | 46 |
| 302/17 | 17/00971-3 | Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn | 51 |
| 303/17 | 16/03934-2 | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1401a við Sundsvegin | 54 |
| 304/17 | 17/03314-1 | Fjósið í Hamrabøi í Kollafirði | 56 |
| 305/17 | 17/01044-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini við Glyvursnes frá B11 øki til 4. grundumráði | 59 |
| 306/17 | 17/03802-1 | Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn | 60 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 307/17 | 17/00899-1 | Bústaðarpolitikkur | 63 |
| 308/17 | 17/02247-1 | Gøtan kring Havnina og fiskastykkið | 69 |
| 309/17 | 17/02248-1 | Havnadalur - fríøkið | 72 |
| 310/17 | 17/02864-1 | Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri | 75 |
| 311/17 | 17/03645-1 | Flyting av løgujáttan - eykajáttan | 77 |
| 312/17 | 17/03726-1 | Eykajáttan konto 8375 rakstrargøgn | 80 |
| 313/17 | 17/03698-1 | Lýsing eftir fyrisitingarstjóra til Tórshavnar kommunu | 82 |
| 314/17 | 17/04135-1 | Setan av tekniskum stjóra | 85 |
| 315/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 86 |
| 316/17 | 17/03470-2 | Umsókn frá B36 um íløgustuðul til tribunu | 89 |
| 317/17 | 17/03653-2 | Umsókn frá HB um íløgustuðul til tribunu | 91 |
| 318/17 | 17/03122-25 | Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF | 93 |
| 319/17 | 15/01465-2 | Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir. | 95 |
| 320/17 | 17/04063-1 | Heimild til at reisa verjumál | 102 |

## ***288/17 Helena Dam á Neystabø: farloyvi frá býráðnum***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 288/17 | 17/01364-11 |

**Málslýsing:**
Helena Dam á Neystabø hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.
Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bjørg Dam, eru loknar.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 289/17 Mál beind í nevndir 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 92/17 | 17/00041-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 117/17 | 17/00041-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 135/17 | 17/00041-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 157/17 | 17/00041-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 202/17 | 17/00041-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 231/17 | 17/00041-1 |
| 9 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 257/17 | 17/00041-1 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 289/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 290/17 Ársroknskapur og granskoðanarprotokoll fyri 2016 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 309/17 | 17/03044-2 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 290/17 | 17/03044-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Roknskapurin fyri 2016 verður latin Tórshavnar kommuna til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2016 verður framlagdur.

**Nevndarfundur 24. apríl 2017:** Góðkendur og samtykt at mæla fíggjarnevndini til at góðkenna roknskapin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>14. desember 2017 | Blað nr.: 8 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at góðkenna roknskapin hjá Westward Ho og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Eimmælt samtykt.

# 291/17 Útstykking Kaldbak - sølustøða.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 64/16 | 14/01389-16 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.05.2016 | 165/16 | 14/01389-16 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 203/16 | 14/01389-16 |
| 4 Kaldbaksnevndin | 24.10.2016 | 7/16 | 14/01389-16 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 29.03.2017 | 3/17 | 14/01389-16 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 151/17 | 14/01389-16 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 162/17 | 14/01389-16 |
| 8 Kaldbaksnevndin | 20.06.2017 | 6/17 | 14/01389-16 |
| 9 Kaldbaksnevndin | 04.12.2017 | 9/17 | 14/01389-16 |
| 10 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 225/17 | 14/01389-16 |
| 11 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 233/17 | 14/01389-16 |
| 12 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 292/17 | 14/01389-16 |
| 13 Kaldbaksnevndin | | | 14/01389-16 |
| 14 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 291/17 | 14/01389-16 |

**Málslýsing:**
**Útstykking Kaldbak - Sølustøða.**

Útstykkingin í Kaldbak umfatar í alt 10 sethúsagrundstykkir.  Fermeturprísurin er kr. 793,51.

Grundøkini eru matrikuleraði fyri góðum 2,5 árum síðani, men eru enn bert 4. stykkir seld.

Ein av eigarunum ynskir at lata stykkið innaftur, og er í løtuni bert ein møguligur áhugaður keypari til eitt av stykkjunum.

Í sølutilgongdini hevur tað eisini víst seg, at áhugi var at keypa tey 4 uttastu stykkini ( tey sum liggja móti bygdini ) tí her var minni jarðarmunur.

Útstykkingin er annars sera trupul, tí talan er um sera stóran jarðarmun, og er tí talan um dýra og tekniskt trupla byggibúning, samstundis sum fermeturprísurin er høgur.

Jarðarmunurin verður størri longur inni, og er byggibúningarkostnaðurin tískil hægri, longur inni móti kaldbaksfirði.

Ein møgulig loysn kundi tí veri at kommunan átók sær at gera grundøkini byggibúgvin.

Trupulleikin er tó at stykkini tá vildu gjørst enn dýrari.

Ein kanning av møguligum byggibúningarkostaði eigur at vera umhugsað.

Annar møguleiki er at lýsa stykkini til sølu, til marknaðarprís. Í hesum føri verður marknaðarprísurin mettur at vera lægri enn kostprísur.

Kommunan kann í eini sølutilgongd áseta ein mettan minstaprís.

**Dømi:**

Um kommunan selir stykkini fyri kr. 550 fermeturin ( sum kann vera minstiprísur )

Talan er um í alt. 5.164 fermetrar á kr. 793,51 = kr. 4.097.685,64

Harav eru seldir 1.590 fermetrar á kr. 793,51 = kr. 1.633.043,58

= útlegg kr. 2.464.642,06

Um øll stykkini verða seld fyri kr. 550,00 fermeturin, fær útstykkingin eitt hall á kr. 1.257.486,64 ( Herav endurgjald til teir 4. verandi eigararnar í alt kr. 501.143,58 )

Um teir 4. eigararnir verða hildnir uttan fyri verður hallið kr. 756.343,06

Um stykkini vera seld í fríðari sølu, verður mett at stykkini fáa ymiskan prís, samstundis sum onkur stykki framvegis ikki verða seld.

Umsitingin er í iva um hvat gerast skal. Vanligt er at selja stykkini í eini skipaðari útstykking til kostprís, og til teir møguligu keyparar sum standa á bíðilista til sethúsagrundøki.

Í hesum føri hevur tað ikki eydnast at selja stykkini eftir bíðilista, og heldur ikki nú stykkini hava ligið í fríðari sølu til fastan prís.

Tað er okkara metan at stykkini eru ov dýr, samstundis sum tey eru trupul og dýr at gera byggibúgvin

Trupult er at áseta marknaðarprísin sum væntandi eisini í hesum føri kann gerast lægri enn uppstillaðu kr. 550 pr. fermeturin.

Um kommunan velur at selja stykkini til marknaðarprís, er spurningurin eisini um kommunan er moralskt bundin fyri teimum keyparum sum frammanundan longu hava ognað sær eitt stykki til kostprís.

Løgdeildin metir ikki at kommunan er juridiskt bundin at gomlu keyparunum, tí talan er um endaligan handil, har keyparin til tá kendar fortreytir keypir eitt grundøki til ásettan prís.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at fíggjarnevndin umrøður málið.
Skal kommunan

1. Lýsa stykkini til sølu í fríðari sølu til marknaðarprís.
2. Kanna møguligan byggibúningarkostnað.
3. Gera byggibúning lidnað og selja til kostprís.
4. Gera byggibúning lidnað og selja til marknaðarprís
5. Um stykkini verða seld til marknaðarprís. Vil kommunan tá endurrinda verandi eigarum ein møguligan mun millum kostprís og marknaðarprís. Og hóast mett verður at kommunan ikki er juridiskt bundin at einum endurgjaldi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**

Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyristingarstjórin mæla til at lýsa tey óseldu stykkini í fríðari sølu til marknaðarprís.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til, at grundøkini hava verið boðin til sølu á bíðilistanum hjá kommununi, men at áhugi ikki er til staðar at ogna sær grundøkið, verður mælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum og lýsa grundøkini til sølu í fríari sølu, og verða tey seld, um hóskandi boð fæst.

**Býráðið 2. mai 2012:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**Ískoyti.**
Inni hevur fingið uppgávuna at selja grundøkini í Kaldbak. tó við fyrivarni um, at býráðið skal góðkenna søluna av hvørjum einstøkum grundøki.

Eigararnir av tveimum óbygdum grundøkjum hava gjørt vart við, at samtyktin í býráðnum um at selja grundøkini í fríðari sølu hevur ta fylgju, at teirra grundøki fáa lægri virði.

**Matr. nr. 22aa, Kaldbak. Eigari, Rúni Hvannastein**. Vídd á grundøki 520 m². Keypsprísur. kr. 412.625,20

Rúni hevur fyri góðum ári síðani heitt á kommununa um at taka stykkið inn aftur fyri keypsprís. Kommunan hevur havt stykkið á sølulista, men er stykkið framvegis ikki selt.

Síðani hevur kommunan samtykt at selja stykkini í fríari sølu, og eru møguleikarnir fyri at kunna selja hansara stykki fyri upprunaprís lítlir og ongir. Rúni vísir á, at samtyktin ger hansara støðu verri, tí ongin fer at keypa hansara stykki fyri kostprís, um hini óbygdu stykkini verða seld fyri lægri prís.

**Matr. nr. 22t, Kaldbak. Eigari, Petur Nolsøe.** Vídd á grundøki 525 m². Keypsprísur kr. 416.592,75

Petur hevur fyri stuttum keypt stykkið. Hann hevur gjørt sáttmála við Norðsetur, og hevur eisini fingið byggiloyvi.

Talan er um eina trupla útstykking. Grundøkini eru dýr, og er talan um dýra byggibúning, tí útstykkingin liggur í lendi við stórum hæddarmuni.

Um kommunan samtykkir at taka stykkini inn aftur, hava omanfyri nevndu eigarar saman við øðrum áhugaðum møguligum keyparum møguleika til at keypa egin stykki aftur.

**Tilmæli:**
Vísandi til at talan er um eina trupla og dýra útstykking, mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at keypa óbygdu stykkini aftur fyri kostprís.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti 29. august 2012.**

Nakrir eigarar av ábygdum sethúsa grundøkjum í útstykkingini hava í brævi 10. juli 2012 (2012-1733/1), vent sær til kommununa.

Teir vísa til býráðssamtyktina 2. mai 2012, og ynskja at fáa afturgoldið tann munin sum stykkini verða seld fyri í dag, og tann prís sum teir keyptu stykkini fyri. Teir meta at talan verður um umleið kr. 200.000,00 hvør, ella umleið kr. 800.000,00 í alt.

Býráðið samtykti 2. mai 2012 at selja óseldu stykkini til hægstbjóðandi.

Grundøkini eru ábygd, og eru stykkini eisini leys av øllum kommunalum bindingum viðvíkjandi víðarisølu.

Hesir eigarar hava eins og allir aðrir eigarar av grundøkjum við ábygdum sethúsum í kommununi, eina ogn sum kann seljast til marknaðarvirði, og er teirra grundøki partur av samlaða virðinum.

Kommunan kann ikki endurrinda eigarum av ábygdum sethúsa grundøkjum endurgjald og hevði tað um so var ikki verið í tráð við rættarnormin um, at myndugleikar ikki mugu geva ávísum borgarum framíhjárættindi í mun til aðrar.

**Tilmæli:**
Mett verður at kommunan hevur ikki heimild til at endurrinda eigarunum av ábygdu grundøkjunum munin millum keypsprís og møguligan søluprís av grundøkjunum í dag, og mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til ikki at ganga umbønini á møti.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini siga at prísurin á ognartorginum á torshavn.fo er ikki dagførdur. Gott var um stykkini vóru lýst við røttum prísi.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:** Limirnir í staðbundnu nevndini skjóta upp, at bjóða Bústaðir óseldu økini. Møguligar broytingar í byggisamtyktini vóru eisini umrøddar.

**Ískoyti 03.02.2016.**
Útstykkingin umfatar í alt 10 grundstykkir. 6 omanfyri og 4 niðanfyri vegin.

Bert eitt grundstykkið omanfyri vegin er selt, meðan trý grundstykki sum liggja niðanfyri vegin, eru seld. Talan er sostatt um 4 seld grundstykkið í býlinginum. Sethús eru bygd á hesi

fýra grundstykkini. Viðmerkjast kann, at sethús eru bygd á hesi 4 grundstykkini, og hevur ein av uppruna eigarunum selt sítt grundstykkið við ábygdum sethúsum.

Teir 4. uppruna eigararnir hava í skrivi 12.02.2014 (Skjal 14/01389-15) vent sær til kommununa, har teir vísa sína ónøgd við, at kommunan nú selur grundstykkini fyri kr. 200.000,00 og ynskja hesir keypara, at verða javntstillaðir við komandi keyparar.

Grundstykkini hava ligið á sølulista hjá INNI síðani juli 2012 við einum prísuppskoti á kr. 200.000 men eru ongi grundstykki seld síðani tá.

Inni hevur nú móttikið eitt boð áljóðandi kr. 200.000,00 (sí mál nr. 15/04699).

Kostprísur fyri grundstykkið er 411.832,- og er innkomið boð kr. 211.832,- lægri enn kostprísur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til ikki at selja grundstykkið fyri innkomið boð áljóðandi kr. 200.000.

Mælt verður til at taka grundstykkini av aftur sølulistanum hjá Meklara, og at grundstykkini koma at standa á sølulista hjá kommununi til kostprís.

Mælt verður samstundis til, at beina málið í byggi og býarskipanarnevndina, við atlitið til at endurskoða útstykkingina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mai 2016:** Umrøtt og beint aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Umrøtt.

**Kaldbaksnevndin 24. oktober 2016:** Nevndin samtykti at biðja um at fáa umboð fyri Bústaðir á fund í kaldbaksnevndina um framtíðar bústaðir í Kaldbak.´

**Ískoyti:**
Umboð frá umsitingini kemur inn at greiða frá málinum.

**Kaldbaksnevndin 29. mars 2017:** Umrøddir vóru ymiskir møguleikar. Ein møguleiki er at sláa grundstykkini saman og eitt nú selja tað til Bústaðir. Ein annar møguleiki er at selja stykkini til marknaðarprís og fáa eina kostnaðarmeting.

**Ískoyti:**

Grundstykkini í útstykkingini Við Krossá í Kaldbak, hava staðið á sølulista hjá kommununi síðani 2009.

Í útstykkingini eru 10 grundstykki, og eru 4 higartil seld, meðan hini 6 grundstykkini framhaldandi liggja óseld.

Grundstykkini eru  óútgrivin. Avbjóðingar eru í lendinum, soleiðis at tað er rættuliga umfatandi og dýrt at planera stykkini.

Kommunan hevur biðið tveir meklarar um at virðismeta stykkini.
Onnur metingin kom inn áðrenn skráin fór út.

Betri heim metir søluvirðið fyri matr. nr. 22s til kr. 250.000,00 og hini matriklini, 22v,22x,22y,22z, og 22aa til kr. 150.000,00 pr. stk.

Skyn hevur mett virðið av grundstykkjunum til kr. 500 kr. fermeturin, svarandi til ein mettan søluprís í alt á kr. 1.550.500,00

Um vit selja grundstykkini fyri ein miðal metingarprís ( SKYN kr. 500 + miðjal INNI kr. 323 ) verður miðal fermeturprísurin kr. 411,5 og verður samlaði søluprísurin fyri útstykkingina í síni heild tá 1.276.061,50

Bókað útlegg er kr. 2.125.393.  – mettan søluprís kr. 1.276.061,50 og restútlegg 849.331,50

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mælir til at lýsa grundstykkini til sølu fyri í  minsta lagi prísuppskot sambært meting, og at fíggja restútlegg kr. 849.331,50 yvir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur).

**Kaldbaksnevndin 20. juni 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at Tórshavnar kommuna fer í samráðingar við Bústaðir um møguleiki er at byggja íbúðir á stykkinum omanfyri vegin. Um hesar samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turid Horn samtykkja at selja grundstykkini undir vegnum matr. 22s til marknaðarprís kr. 213.568,50 og at fara í samráðingar við Bústaðir um at byggja íbúðir á stykkinum omanfyri vegin. Um hesar samráðingar ikki bera á mál verður farið undir at selja grundøkini omanfyri vegin fyri marknaðarprís og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at núverandi eigarar í útstykkingini ikki verða viðgjørdir undir somu treytum.
Klik her for at angive tekst.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndni, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti.**

Grundstykkið matr. nr. 22s, Kaldbak ( við Krossá 5 ) hevur staðið á sølulista hjá BetriHeim í góðan mánaða.

Meklarin boðar frá, at innkomið er eitt boð á kr. 215.000,00 og at boðgevingin er støðgað.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja grundstykkið fyri innkomið boð kr. 215.000,00

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at grundøkini í útstykkingini ikki eru seld fyri einsljóðandi prís.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti.**

Viðvíkjandi grundstykkjunum omanfyri vegin.

Bústaðir hevur boðað frá, at teir møguliga hava áhugað í at ogna sær lendið til bygging av bústøðum, men at talan er um dýrt lendi at gera klárt, og at talan er um eitt lítið tal av íbúðum sum kunnu byggjast á hesum økinum. At fokus hjá Bustøðum er, at fáa aðrar ítøkiligar verkætlanir klárar við til samans 200 íbúðum.

Kaldbaksnevndin hevur eisini víst á matr.nr. 33, Kaldbak, sum liggur óbygt. Bústaðir metir, at til ber at byggja 2 íbúðir á hetta grundstykkið, og vil viðgera tann spurningin og venda aftur.

Grundstykkini omanfyri vegin eru virðismett av Betri heim, sum virðismetir hvørt grundstykki til kr. 150.000,- meðan Skyn metir at grundstykkini kunnu seljast fyri ein fermeturprís á kr. 500, og verður prísurin hjá Skyn ymiskur vísandi til at stykkini eru ymisk í vídd. Útroknaður miðjalfermeturprísur hjá Skyn er kr. 323. Miðjal fermeturprísurin hjá báðum meklarunum verður hereftir kr. 411,5

Um vit taka miðjal tøl millum virðismetingarnar hjá Skyn og hjá Betri Heim, verður mettur marknaðarprísur hesin.

| **Matr. nr.** | **Vídd.** | **Mettur marknaðarprísur.** |
|---|---|---|
| 22v | 544 | 223.856,00 |
| 22x | 500 | 205.750,00 |

| | | |
|---|---|---|
| 22y | 511 | 210.276,50 |
| 22z | 507 | 208.630,50 |
| 22aa | 520 | 213.980,00 |

**Tilmæli:**
Vísandi til, at Bústaðir í løtuni ikki hevur  ítøkiligar ætlanir um, at byggja íbúðir á ognini, mæla kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini til, at lýsa grundstykkini til sølu til mettan marknaðarprís, sí omanfyri.

**Kaldbaksnevndin 04. desember 2017:** Nevndin metir at tað skal viðmerkjast í sølulýsingingini at møguleiki er fyri at keypa fleiri enn eitt stykki um áhugi er fyri íbúðarbygging/bústaðarbygging.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og viðmerkingini hjá Kaldbaksnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Samtykt vi 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen.
[Lagre]

# 292/17 Umsókn um góðkenning av søluavtalu millum TF Ognir og Gist & Vist

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 209/15 | 15/02098-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 137/15 | 15/02098-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 293/17 | 15/02098-2 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 292/17 | 15/02098-2 |

**Málslýsing:**
Niels Winther Poulsen, advokatur, hevur vegna P/f Gist & Vist søkt um góðkenning av søluavtalu millum P/f TF Ognir og P/f Gist og Vist, ið inniber, at P/f Gist og Vist keypir part av matr. nr. 378, Tórshavn, ið Tórshavnar kommuna við fyribilsskeyti hevur selt P/F TF Ognir.

Keypspeningurin er tann sami, sum TF Ognir keypti ognina fyri frá kommununi, og Gist & Vist hevur treytað sær í søluavtaluni millum partarnar, at kommunan góðkennir avhendingina sambært ásetingarnar í fyribilsskeytinum, og at Gist & Vist yvirtekur øll rættindi og allar skyldur sambært fyribilsskeyti.

Tórshavnar kommuna seldi í 2010 P/F TF Ognir umleið 500 m² burturav ognini matr. nr. 378, ið verður at nýta til at byggja hotell á. Sambært fyribilsskeytinum skuldi byggingin byrja í seinasta lagi 1. apríl 2012 og verða liðug í seinasta lagi 1. apríl 2014.

Eingin bygging er farin fram á økinum enn, og P/f Gist og Vist hevur treytað keypið av, at Tórshavnar kommuna gevur felagnum nøktandi freist at fara undir byggibúning og bygging á ognini.

Tilmæli: Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at góðkenna fyriliggjandi søluavtalu millum P/f TF Ognir og P/f Gist & Vist og at áseta eina freist fyri byggibúning og bygging á ognini.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið við tilmæli um, at byggingin á økinum skal byrja innan tvey ár, og at byggingin skal verða liðug í seinasta lagi um 4 ár.

**Býráðsfundir fyri læstum hurðum 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Sp/F Gist&Vist hevur í umsókn til Tórshavnar kommunu søkt um at fáa longt freistina fyri at fara undir bygging á matr. nr. 378, Tórshavn. Felagið hevur ætlanir um at søkja um byggiloyvi í seinasta lagi 30. desember 2017, og søkir um at fáa freist til 1. juli 2020 at byggja nýggjan hotelbygning á ognini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka undir við umsóknini frá Sp/f Gist&Vist og leingja byggifreistirnar soleiðis, at søkt verður um byggiloyvi í seinasta lagi 30. desember 2017, og at bygningurin er liðugur í seinasta lagi 1. juli 2020.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

## 293/17 Uppskot til semju um læknahølini í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 138/15 | 15/01750-53 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 86/15 | 15/01750-53 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 314/17 | 15/01750-53 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 293/17 | 15/01750-53 |

**Málslýsing**:
Páll Nielsen, advokatur hjá Finni Simonsen, hevur í gerðarrættarmálinum móti Finni Simonsen, UP Verkfrøði og MAP Arkitektar boðið kommununi semju í málinum áljóðandi 200.000 kr. Christian Andreasen, advokatur hjá Tórshavnar kommunu, hevur treytað eina møguliga semju við Finn Simonsen av, at UP Verkfrøði og MAP Arkitektar vátta, at semjan ikki ávirkar teirra rættastøðu. Hetta hava teir nú váttað.

Christian Andreasen, advokatur, hevur fingið dokumentatión fyri fíggjarstøðuni hjá Finni Simonsen, og vísir hendan, at hann ikki er førur fyri at gjalda alt kravið frá kommununi, sum í stevningini er gjørt upp til kr. 2.000.000. Advokaturin mælir tí til, at semja verður gjørd um, at Finnur Simonsen rindar kommununi kr. 200.000 og sostatt ikki longur er partur av sakarmálinum um endurgjald fyri læknaviðtaluhølini.

Semjan fer ikki at ávirka kravið hjá Tórshavnar kommunu móti hinum pørtunum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til semju millum Tórshavnar kommunu og Finn Simonsen, sum inniber, at Finnur Simonsen rindar Tórshavnar kommunu kr. 200.000.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:** Læknaviðtaluhølini í Kollafirði eru nú liðugt umvæld, og gjørdist samlaði kostnaðurin av umvælingini kr. 931.907.

Við støði í hesum kostnaði hevur advokaturin hjá Tórshavnar kommunu skotið upp, at ein semja verður gjørd við UP verkfrøði og MAP Arkitektar, soleiðis at partarnir rinda kr. 250.000 hvør til fulla og endaliga avgreiðslu av gerðarrættarmálinum.

Umboð partanna hava í hesum sambandi boðað frá, at tikið verður av uppskotinum til semju, soleiðis at samlaða upphæddin at rinda verður hendan:

| | |
|---|---|
| Betri Trygging (vegna UP Verkfrøði) | kr. 250.000 |
| Frádrigið sjálvsábyrgd, ið tryggingin og UP Verkfrøði ikki rinda | kr. 20.800 |
| | kr. 229.200 |

| | |
|---|---|
| Tryg vegna MAP Arkitektar | kr. 250.000 |
| Frádrigið sjálvsábyrgd, ið Tryg ikki rindar | kr. 25.000 |
| | kr. 225.000 |
| | |
| Sjálvsábyrgd, ið MAP Arkitektar rinda | kr. 25.000 |
| | |
| Tilsamans | kr. 479.200 |
| | |
| Arbeiðstakarin hevur rindað sambært semju | kr. 200.000 |
| | |
| Endurgjald íalt | kr. 679.200 |

Sakførari kommununnar metir, at upphæddin kr. 679.200 er mesta upphædd, ið Tórshavnar kommuna kann fáa í fyriliggjandi máli – eisini um gerðarrættarmálið verður tikið upp til dóms – og mælir hann tískil kommununi til at taka av uppskotinum til semju.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at taka av fyriliggjandi uppskoti til semju, so samlaða endurgjaldsupphæddin at rinda Tórshavnar kommunu verður 479.200 umframt kr. 200.000, ið arbeiðstakarin frammanundan hevur rindað, íalt kr. 679.200.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

## 294/17 Keyp av lendi til Á-handil við Landavegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 12/17 | 17/00345-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 34/17 | 17/00345-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 39/17 | 17/00345-2 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 80/17 | 17/00345-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 304/17 | 17/00345-2 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 294/17 | 17/00345-2 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar Kommuna hevur 22. januar 2017 móttikið umsókn frá Ragnar Zachariasen, frá Zeta arkitektum, vegna P/f Poul Hansen, um keyp av uml. 110 m$^2$ av lendi frá matr 1046a, frá Tórshavna Kommunu, á Geitagerði, í sambandi við útbyggingarætlan av matvøruhandlinum Á við Landavegin og víðkan av parkeringsøki teirra.

Lendið, sum P/f Poul Hansen ynskir at keypa, er vegastubbi, sum liggur millum verandi Á handil matr.1046af, matr. 1046ak og matr. 1046ae, sum P/f Poul Hansen eisini er eigari av. Sí tekningar 17-00345-1 A3 Mappa.

Í undirlendinum er kloakkføring, sum møguliga skal umleggjast í sambandi við útbyggingina av bygninginum og gerð av parkeringsøkinum. Útreiðslur av møguligari umlegging skal P/F Poul Hansen bera kostnaðin av. Henda umlegging umfatar eisini leiðingar frá matr. 1046ah.

Fyri at selja lendið, skulu matr. 1046af, 1046ak og 1046a leggjast saman í ein matrikul.

**Ásetingar úr byggisamtyktini:**
§ 5. Ásetingar fyri umráðspartarnar A1 í3. Grundumráði. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, ......

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at Tórshavnar kommuna selur P/f Poul Hansen nevnda matr. 1046a og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndir Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum, treytað av at ferðsluviðurskiftini í økinum verða loyst, soleiðis at ferðslutrygdin verður nøktandi í mun til øktu ferðsluna í økinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Kommunan hevur skyldu til at selja økið til marknaðarprís men hevur ikki skyldu til at bjóða hetta stykki út, tí stykki er eru undir 300m2 og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á, vísandi til undantakið í §2, stk. 1. nr. 3. í kunngerð nr. 122, frá 22. december 2000, um alment útboð av kommunalari fastogn.

Talan er um ein vegastubba, sum keyparin skal brúka til byggilendi. Keyparin stendur sjálvur fyri at broyta økið  til ætlaðu nýtsluna, herundir at umleggja møguligar leiðingar o.a., og er keyparin sinnaður at rinda 1.400 kr/m2 fyri økið.

Keyparin rindar allar útreiðslur í samband við keypið, herundir matrikulering og tinglýsing.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja lendið, uml. 110 m2 fyri 1.400 kr. m2.

Sí uppskot til treyta skeyti. Skjal nr. 17/00345/10

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 295/17 Umsókn um keyp av øki at leggja afturat matr. nr. 185c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2017 | 188/17 | 17/02940-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 302/17 | 17/02940-2 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 295/17 | 17/02940-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Annfinn Hansen søkir vegna Sp/f Undir Bryggjubakka um at keypa eitt øki Undir Bryggjubakka, sum er umleið 45 fermetrar til støddar í sambandi við ætlanina at byggja eitt íbúðarhotell.

Kommunan hevur viðmælt at leggja matr. 168b, 168a, 161b,185c til ein matrikul.
Eftir at bryggjukanturin varð fluttur longur út, liggur tann parturin sum søkt verður um at keypa, natúrliga sum patur av byggiøki og í samsvari við eina byggilinju.

Víst verður til byggimálið j. nr. 17/01760, sum eisini verður viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini, eisini skal vísast til viðmerkingarnar frá Tórshavnar Havn j. nr. 17/02940/3.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki mál sum hevur týdning fyri hetta málið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisflokking 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar fíggjarligar bindingar fyri kommununa

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Umsókn um at keypa økið j. nr. 17/02940/1
Viðmerkingar frá Tórshavnar Havn j.nr. 17/02940/3

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, at selja 45 fermetrar av kommunalari ogn til at leggja saman við 185c og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Eigarin av matr. nr. 185c hevur áður verið í samráð við kommununa, um ætlaða bygging á staðnum, ið tá datt niðufyri. Partarnir vóru tá samdir um, at tað var trupult at gjøgnumføra byggingina, uttan at bryggjan varð breiðkað, fyri at ferðslan kundi koyra aftur og fram.

Samráðst var um treytirnar, herundir hvør skuldi rinda fyri at bryggjukanturin bleiv fluttur út. Fíggjarnevndin samtykti 21. november 2002 (j.nr. 2002-1699/16), at eigarin skuldi bera helvtina av kostnaðinum av at breiðka bryggjukantin. Hetta út frá samráðingum við eigaran og út frá einari einfaldari og bíligari loysn, enn tann loysn ið at enda varð vald.

Málið kom nú í drag og eigarin misti áhugan. Tórshavnar havn valdi, nøkur ár seinni, at fremja ætlanina og framvegis við atliti til ætlanina hjá eigaranum av matr. nr. 185c.

Eigarin og kommunan hava samráðst um málið út frá uppruna avtalum og ætlanum, og er eigarin av matr. nr. 185c sinnaður at rinda 0,9 mió. kr. fyri øki.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, havnameistarin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at selja umbidna øki fyri 0,9 mió. kr. og at flyta peningin til Tórshavnar havn, ið hevur borið kostnaðin.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at mæla býráðnum til at taka undir við søluni, ið tó er treytað av, at snið og útsjónd verður gjørd í samráð við býararkitekrin, at parkeringsviðurskiftini verða loyst og annars við treytum, sum umsitingin setur, vísandi til samtyktina hjá byggi- og býarskipanarnevndini 8. november 2017.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 296/17 Umskipan av kloakk frá Óðinshædd til Boðaneshamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 75/17 | 17/03875-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 299/17 | 17/03875-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 296/17 | 17/03875-1 |

**Upprunin til málið:**
Økt byggivirksemi á Óðinshædd til Boðaneshamar

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við økt byggivirksemi á Óðinshædd til Boðaneshamar j.nr. 17/03875-2 og 17/03875-3 er neyðugt hjá TK at leggja nýggja kloakk til útstykking hjá Bústaðir, samstundis sum verandi kloakk- og regnvatnsleiðingar á økinum mugu umleggjast og dagførast.

Umsitingin ynskir at bjóða arbeiðið út til ráðgeva at lýsa tørvin og at gera uppskot til loysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingin viðmerking.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingin viðmerking

**Umhvørvisárin.**
Betri skipan av kloakk- og yvirflatuvatnleiðingum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingin viðmerking.

**Skjøl**
j.nr. 17/03875-2
j.nr. 17/03875-3

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Mett verður at samlaði fíggjartørvurin fyri at bjóða arbeiðið út til ráðgeva at gera projektuppskot til loysn er kr. 300.000.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 300.00,- av markaðum íløgum fyri kloakkir 2017, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at játtanin skal av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 297/17 Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 7/14 | 14/01352-11 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 2/16 | 14/01352-11 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 19/16 | 14/01352-11 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 31/16 | 14/01352-11 |
| 5 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 36/16 | 14/01352-11 |
| 6 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 144/16 | 14/01352-11 |
| 7 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 118/16 | 14/01352-11 |
| 8 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 73/17 | 14/01352-11 |
| 9 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 300/17 | 14/01352-11 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 297/17 | 14/01352-11 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

Ætlanin fevnir sum kunnugt um:
1. Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
2. Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
3. Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
4. Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
5. Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
6. Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
7. Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til at raðfesta arbeiðini í nevndu spillivatnsætlan soleiðis, at játtanin var í hesi raðfylgju í 2012: 7,5 mió., í 2013: 7,5 mió. og í 2014: 4,1 mió.

Spillivatnsætlanin fevnir um dagføring av kloakkum í umleið 20 ymsum støðum í allari kommununi og fyri at fáa útgreinað ítøkiligari hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering av kloakkarbeiðunum í nøkrum av hesum støðum. Eftirfylgjandi verður farið undir tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu kloakkarbeiði.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og ynskir umsitingin við hesum at fáa loyvi at bjóða serstøk økið út til ráðgevandi virki at gera skitsuprosjekt og kostnaðarmeting av ávísum økjum, sum umsitingin vísir á.
Talan er um niðanfyri standandi øki:

1. **Kloakkir í Kollafirði**

Fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni, er ætlanin at gera arbeiðið liðugt at savna allar kloakkir í Kollafirði, Kollfjarðardali og Hundsarabotni í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Miðað verður eftir at savna so nógvar útleiðingar saman sum møguligt, áðrenn tær verða leiddar út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørdur, talan er um Norðuri í Sundinum í Líðini og á Oyrareingjum.

2. **<u>Kloakkir í Kaldbak og Kaldbaksbotni</u>**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir í Kaldbak í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt, við Á er útleiðing lóglig. Inn á Gørðum og inni á Fløtum er kloakkin leidd í skipaðar leiðingar.

3. **<u>Kloakkir við Bakkagøtu og á Argjaboða á Argjum</u>**
   Ætlanin er framhaldandi at samla kloakkirnar á Argjum í skipaða leiðing og út á sjógv fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni. Talan er um kloakkútleiðingar við Bakkagøtu og Argjaboða

   Partur av arbeiðinum at fylgja krøvinum fá Umhvørvisstovuni er longu gjørt, við Sjósavnið, við Bátahylin og frá kloakkini frá Kongavarða/Hamrinum.

4. **<u>Kloakkir í Syðradali og Norðadali</u>**
   Henda ætlanin er at samla kloakkirnar ávikavist í Syðradali og Norðadali í skipaða leiðing fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta:
1) kr. 300.000,- til projektering av kloakkum í Kollafirði
2) kr. 150.000,- til porjektering av kloakkum í Kaldbak og Kaldbaksbotni
3) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum við Bakkagøtu og á Argjabooða á Argjum
4) kr. 100.000,- til projektering av kloakkum í Syðradali og Norðadali
ella samanlagt kr. 700.000,- til tey 4 omanfyri standandi arbeiði av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini spyrja hvør arbeiðsætlan fyriliggur fyri Kaldbak. Hvussu nógv av teimum 150.000 kr eru brúktar.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:**Umsitingin kunnaði um at projekteringsarbeiðið er í gongd við atliti til at gera arbeiðið í næsta ár.

**-Ískoyti:**

Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 400.000 til projektering av framfluttum íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012, kt. 6875.

5. **Kloakkir á Hvítanesi**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir á Hvítanesi í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Størsti parturin at skipa leiðingarnar á Hvítanesi er longu gjørt og er ætlanin at beina hesar leiðingar í góðkenda leiðing sunnan fyri Hvítanes.

6. **Kloakkir í Kirkjubø og á Velbastað**
   Ætlanin er at samla allar kloakkir ávíkavist í Kirkjubø og á Velbastað í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt og fevnir arbeiðið um at skipa so fyri at útleiðingarnar lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma minst 1 m. undir størstu fjørðu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta:
5) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum á Hvítanesi
6) kr. 250.000,- til projektering av kloakkum í Kirkjubø og Velbastað
   ella samanlagt kr. 400.000,- til tey 2 omanfyri standandi arbeiði av framfluttum íløgum fyri kloakkir fyri 2012 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot fyri Kirkjubø og Velbastað at savna allar kloakkir í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðugt. Á Velbastað er ætlanin at savna tær núverandi 4 útleiðingar á sjógv í eina skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv, so útleiðingin líkur krøvini frá Umhvørvisstovuni. Sí j.nr 15/03558.

Í Kirkjubø er ætlanin at savna allar kloakkirnar í verandi útleiðing á Sjógv. j.nr. 15/03200.

Ætlanin er, at fáa PB Consult gera prosjekt klárt til útbjóðing og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2016, kt. 6875 til gerð av útbjóðingartilfari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkir fyri 2016 konto 6875 til at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Nevndin staðfestir, at játtaður peningur sambært samtykt 28. november 2013 er nýttur til støðulýsing/heildarætlan fyri økini á Hvítanesi, Kirkjubø og Velbastað og ikki til projektering.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.
Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekt fyri Kirkjubø og Velbastað, at savna allar kloakkir í skipaða leiðing og leggja út á streymasjógv er liðugt og boðið út í innbodnari lisitatión j.nr 15/03558-9. Lisitatiónin varð hildin á skrivstovuni hjá PB-Consult 31. mars 2016, kl. 10.00. Inn komu 4 boð. Av teimum hevði Sp/f Maskingrevstur lægsta boð. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol saman við ráðgeva j.nr. 15/03558-15

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 15/03558-16 verður samlaði fíggjartørvurin fyri prosjekti kr. 2,3 mió. (v/6,25%MVG).
Samlaða upphæddin fyri markaðu íløgum 2016 er kr. 5,8 mió. á Konto 6875.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 2,3 mió. av íløgum fyri kloakkir 2016 konto 6875 og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd, og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L 68023, at savna allar leiðingar á Velbastað og í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðug og avhendað, er staðfest eitt avlop álj. kr. 180.957,-

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Kunnað varð um málið og málið beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 298/17 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv á Argjum - Argir Bakkagøta og Argjaboða, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 3/15 | 14/01987-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2015 | 2/15 | 14/01987-3 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 10/15 | 14/01987-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 1/16 | 14/01987-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 57/16 | 14/01987-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 172/16 | 14/01987-3 |
| 7 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 152/16 | 14/01987-3 |
| 8 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 74/17 | 14/01987-3 |
| 9 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 301/17 | 14/01987-3 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 298/17 | 14/01987-3 |

## Málslýsing:

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Argjum. Talan er um at skipa kloakkleiðing frá Kráargøtu og Bakkagøtu og leiða tær út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í Rossá, sum munnar út í fjøruna (víst verður til frágreiðing j.nr. 14/01987-4 og tekning j.nr. 14/01987-6).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2,8 mio. og er ynski um at fáa heimild at fáa PB Consult at gera útbjóðingartilfar klárt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,25 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 14/01987-5 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,25 mió. (við 6,25% MVG).

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,25 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) L68019 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera prosjekt og útbjóðingartilfar er liðugt og er ynskið at bjóða prosjektið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at prosjektið verður boðið út, lisitatiónsprotokoll verður gjørd og málið verður lagt fyri nevnd aftur at taka støðu til. Prosjektið skal fíggjast av íløgum fyri kloakkir konto 6875.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at savna kloakkirnar fram við Rossá og Bakkagøtu var boðið út í innbodnari lisitatión j.nr. 14/0197-14. Lisitatiónin varð hildin á skrivstovuni hjá PB Konsult 7. apríl 2016, kl. 14. Inn komu 4 boð, av teimum hevði sp/f Plan læsta boð. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokoll og innstilling saman við ráðgeva j.nr. 14/01987-25.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð j. nr. 14/01987-26 verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektið kr. 3,4 mió. (við 6,25% mvg)

Samlaða upphædd fyri markaðum íløgum 2016 er kr. 5,8 mió. Á konto 6875 .

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 3,4 mió. Av íløgum fyri kloakkir 2016, konto 6875, og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 11. mai 2016: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd, og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L 68019, at savna allar leiðingar á Velbastað og í skipaða leiðing út á streymasjógv, er liðug og avhendað, er staðfest eitt avlop álj. kr. 187.852,-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 28. november 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017: Kunnað varð um málið og málið beint í býráðið til kunningar.**

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 299/17 Planlegging av kloakkskipan á Stadionøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2016 | 114/16 | 16/04347-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 433/16 | 16/04347-1 |
| 3 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 345/16 | 16/04347-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 76/17 | 16/04347-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 298/17 | 16/04347-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 299/17 | 16/04347-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við byggivirksemi á stadionøkinum í Gundadali er neyðugt at gera broytingar í kloakkskipanini á staðnum. Hetta er at taka støðu til umleggingar av verandi reinsiverki, somuleiðis umleggja og økja um dimensiónir av verandi og komandi kloakk- og yvirflatuvatns-leiðingum.

Fíggjarlig viðurskifti:
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 200.000,- sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 16/04347-3 og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. J.nr. 16/04347-1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta kr. 200.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2016, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
PB-Consult hevur lýst støðuna og vísir á loysn í samband við umlegging og dagføring av kloakkskipanini á Stadionøkinum í Gundadali, j.nr. 16/0347-7. Tekniska deild ynskir at halda fram við arbeiðinum og at fáa ráðgeva at gera prosjekt klárt til útbjóðing.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði fíggjartørvurin fyri arbeiðið er mettur til kr. 280.000,- sambært fíggjarligu uppgerð og er ynskið at taka av tilboð frá PB-Consult at gera uppskot til loysn. j.nr. 16/04347-7.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 250.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2017, konto 6875 (Kloakkir) og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 300/17 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**

Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.
Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.

Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.
Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum. Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin)**.**

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**
Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.
Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við

vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 301/17 SP/f Protek : Umsókn vegna Gullak Madsen um útstykking av matr. nr. 1216a, Tórshavn (2010-2022)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 143/15 | 14/03818-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 197/15 | 14/03818-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 149/15 | 14/03818-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 1/16 | 14/03818-2 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 67/17 | 14/03818-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 268/17 | 14/03818-2 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 275/17 | 14/03818-2 |
| 8 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 301/17 | 14/03818-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gullak Madsen søkir um útstykkingarloyvi á matr. nr. 1216a, oman fyri Marknagilsvegin.

Vegatkoman skal verða frá grannaognini, matr. nr. 1215a (Erling Johannesen)

Gongdin í málinum higartil:

1. Víst verður á skjal nr. 2004-1133/34, har avtala er undirskrivað millum TK og Gullak Madsen. Í hesi avtalu verður millum annað víst á eina útstykkingarætlan, sí j.nr. 2004-1071-2, har tað framgongur, at randarhús ella grundøki eru staðsett í ovara parti av útstykkingarætlanini. Avtalan er partur av felagsloysn við grannan fyri vestan, Erling Johannesen, um at partarnir í felag gera eina vegaætlan/útstykkingarætlan.

2. Býráðið hevur 26. nov. 2009 samtykt at gera ískoytisavtalu, har tað millum annað framgongur, at vegurin verður gjørdur í 2010, og at partarnir binda seg til at gera eitt felags prosjekt.

3. Eftirfylgjandi hevur Anfinn V. Hansen sett seg í samband við umsitingina og samskift við Jákup Egholm Hansen, fyrrv. tekn. stjóra. Hetta samskifti endaði við einari nýggjari býráðssamtykt tann 27. mars. 2014, har millum annað ongin trygd verður kravd av útstykkjarunum, og tað verður lagt upp til, at umsitingin saman við traðareigarunum í felag skuldu gera neyva útstykkingar- og vegaætlan fyri samlaða økið við støði í áður gjørdum býráðssamtyktum.

<u>Frá innanhýsis fundi:</u>
Eftirfylgjandi hevur ein innanhýsis fundur verið, har alt økið bleiv umrøtt av nýggjum, herundir vegaføringar, útstykkingarætlanir, byggisamtyktir v.m.

Semja er um, at verandi heildarætlan og gjørdar avtalur eiga av verða endurskoðað, tí tað er ikki sannlíkt, at alt hetta letur seg gera, herundir:

1. Útstykkingarætlanin, sum ætlanin er at TK skal gera omanfyri ognina hjá Erling Johannesen, verður alt ov kostnaðarmikil til, at grundøkini kunnu seljast fyri ein hóskandi prís grundað á brattleikan í økinum, umframt at útstykkingin krevur nógv vegaøki í mun til fá grundstykkir.

2. Tað gerst helst trupult at fáa í lag avtalur um vegaføringar, m.a. hvør skal lata lendi og hvussu skal tað fíggjarliga býtast millum partarnar,

3. Mælt verður tí til at arbeiða eftir hesum leisti:
   a) at kommunan stendur fyri og ber kostnaðin at gera vegaføring eystur til markið hjá Erling Johannesen, og at byggibúgva 4 grundøkir til at selja fyri marknaðarprís inni á kommunalum øki, fyri at fíggja ein part av kommunalu vegaføringini.
   b) at vegaføringin inni á privatu ognunum verður sum víst á, sí TK j. nr. 2001-1071/29.
   c) at útstykkjararnir hvør í sær senda inn útstykkingarætlan til góðkenningar, sum er í tráð við almennu byggisamtyktina.
   d) at útstykkjararnir gjalda fyri øll arbeiðir inni á teirra egnu ogn íroknað vegagerð, leiðingar osv.
   e) at býráðið avger, um eigararnir skulu gjalda ein part av kommunalu vegaføringini eystur til vesturmarkið hjá Erling Johannesen, vísandi til at kommunan kemur at standa fyri størsta partinum av vegagerðini, og at hesin parturin bert kemur at bera 4 nýggj grundstykkir og at hetta er tann leistur, sum er brúktur í øðrum kommunalum útstykkingarætlanum.

<u>Fundur við Gullak Madsen:</u>
Tann 15. juli 2015 var fundur við Gullak Madsen.

Á fundinum varð avtalað, at tað má verða kommunan sum stendur fyri at gera fyribils vegin fram til matr. nr. 1215a, og at Erling Johannesen og Gullak Madsen gera vegirnar inni á teirra ogn. Vegurin, sum kommunan skal gera, verður ein fyribils vegur og skal bert nýtast til endalig avgerð er tikin til vegaføringina í umráðnum. Vegurin verður uml. 5 m breiður, uttan gongubreytir og gøtuljós, men skal asfalterast.

Niðurstøðan á fundinum varð, at málið verður lagt fyri í byggi- og býarskipanarnevndina á fyrsta komandi fundi eftir summarfrítíðina, har nevndin m.a. skal taka støðu til:

- at TK ger ein fyribilsveg frá Marknagilsvegnum niðan til trøðna hjá Erling Johannesen, við at leingja verandi veg, sí hjálagda kort j. nr. 14/03818-4
- at verandi vegir á matr. nr.1215a og 1216a, sum ganga út á Marknagilsvegin, skulu burtur, tá nýggja vegatkoman er gjørd.

Kommunan kann gera 4 grundstykkir á matr. nr. 1176 og 1214a, sí hjálagda kort, j. nr. 14/03818-7, sum kunnu seljast og fíggja ein part av fyribils vegnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognin liggur í umráðispartinum A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Víst verður til málslýsingina omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/00624 <u>Høvuðsprojekt: Breiðkan av Marknagilsvegum - Matrikulloysn - Gullak Madsen, matr. nr. 1216a, Tórshavn (2004-1133)</u>

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Støða er ikki tikin til hvat skal byggjast ella hvussu sundurbýti skal verða.

**Umhvørvisárin**
Verður viðgjørt eftir umhvørvisflokki 1.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Kommunan kemur at gera fyribils vegin fram til matr. nr. 1215a, uml. 120 m, sum partvíst kann fíggjast við at kommunan kann selja 4 grundstykkir inni á matr. nr. 1176 og 1214a, sum eru kommunalar ognir.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Hevur ikki verið hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| 14/03818-4 | fyribils vegur og vegir inni hjá Gullak Madsen |
| 14/03818-7 | 4 grundstykkir á matr. nr. 1176 og 1214a |
| 14/03818-5 | fundarfrágreiðing av fundi við Gullak Madsen |
| 14/03818-8 | kort yvir alt økið |
| 14/03818-9 | almenna byggisamtyktin |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við:

- at kommunan ger og fíggjar fyribils vegin niðan til útstykkingarnar, sum er vístur á korti, j. nr. 14/03818-4.

- at kommunan ger og selur 4 grundstykkir inni á matr. nr. 1176 og 1214a, sum víst á korti j. nr. 14/03818-7.

- at eigararnir av matr. nr. 1215a, 1216a skulu lata inn útstykkingarætlanir, sum eru í samsvari við almennu byggisamtyktina.

- at verandi vegir inni á matr. nr.1215a og 1216a, sum ganga út á Marknagilsvegin, skulu burtur, tá nýggja fyribils vegatkoman er gjørd.

- at áður gjørdar avtalur um vegatkomu verða settar úr gildi.

- at játtaðar verða upp til kr. 100.000 til at gera eitt prosjektuppskot og kostnaðarmeting av fyribils vegnum og kommunalu útstykkingini (4 grundstykkir), til at leggja fyri nevndina aftur, soleiðis at endalig støða kann takast til ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 100.000 av konto 8175, vegir, og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið ráðgevan LBF P/f gjørt eitt prosjektuppskot til vegatekniska loysn. Uppskotið tekur støði í at gera ein vegastubba frá verandi atkomuvegi til fyritøkuna Mark P/f, matr. nr. 1214b, og niðan til part av vegateknisku loysnini, sum liggur á økinum Kerjagøta, matr. nr. gc, sum bleiv sett av til vegaøki, har vegaatkoman eftir ætlan skuldi ganga heilt vestur í Dánjalstrøð. Víst verður til prosjektuppskotið, sí TK j. nr. 15/04551-1.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting frá ráðgevanum á kr. 1.897.175,-. Víst verður til TK j. nr. 15/04550-1. Umsitingin hevur gjørt eina samlaða fyribils kostnaðarmeting av verkætlanini áljóðandi kr. 2.831.111,-. íroknað ráðgeving, umsiting og 6,25 % mvg, sí TK j. nr. 15/04550-2.

**Skjøl:**
TK j. nr. 15/04551-1 Tekningar
TK j. nr. 15/04550-1 Kostnaðarmeting frá LBF P/f
TK j. nr. 15/04550-2 Samlað kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla til at tikið verður undir við prosjektuppskotinum til vegatekniska loysn og at fara undir at gera eitt liðugt útbjóðingartilfar og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari útbjóðing til 3-4 arbeiðatakarar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Við tí endamáli at fíggja vegagerðina, hava tey 4 grundøkini verið lýst til sølu hjá einum húsameklarafelag, men er tað ikki eydnast at selja, hetta tí at tíðarætlanin ikki fyriliggur.

Verkætlanin er boðin út og er arbeiðið klárt at seta í gongd, men við tað at grundøkini ikki eru seld, væntar fígging. Kostnaðarætlanin fyri verkætlanina er samlað 4 mió. kr. Sølan av grundøkjunum fer væntandi at geva einar 4,8 – 5,2 mió. kr. (samanborið við grundøki við Villingadalsvegin).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja vegagerðina kr. 4 mió. av konto 6175 umsiting og røkt av fastogn (løgujáttan), at føra peningin aftur, tá ið grundøkini eru seld og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Turið Horn og Annfinn Brekkstein, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og taka av sáttmálanum við Sp/f Andrias Berg áljóðandi kr. 2.934.230,- + mvg og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen, Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Tróndur Sigurðsson

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen, Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Tróndur Sigurðsson.

# 302/17 Verkætlan til framhald av útstykkingini Klingrutjørn - Klingurstjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 5/17 | 17/00971-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 186/17 | 17/00971-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 219/17 | 17/00971-3 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 216/17 | 17/00971-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 77/17 | 17/00971-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 236/17 | 17/00971-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 303/17 | 17/00971-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 316/17 | 17/00971-3 |
| 9 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 302/17 | 17/00971-3 |

**Málslýsing:**
Kunnað verður um status í málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 grundøkini, sum verandi útstykking, sum nýliga er liðug Undir Kongavarða, kann nøkta.

Ráðgevi kommununar LBF P/f hevur tí, eftir áheitan, útvega útstykkingarprosjekt til 45 grundøki afturat, sum er framhald av nevndu útstykking omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða.

Við støði í eindarkostnaðum í tilboðnum frá Articon P/f uppá undanfarnu útstykking, hevur LBF p/f kostnaðarmett framhald av útstykkingini við nevndu 45 grundøkjum til kr. 18.267.105,-.

Í eftirfylgjandi samskifti, sum umsitingin hevur havt við Articon P/f, er ynski sett fram um at einstakir eindarkostnaðir verða príssettir nakað hægri, m.a. spreinging av hellu, sum nú er nærri húsum og tí má gerast við veikari løðingum og at eindarkostnaðir annars verða prístalsreguleraðir við 4,35%.

Um Articon verður gingið á møti í ynskjum teirra um meirkostnaðir, verður mett at umleið 2,3 mió. koma afturat kostnaðarmetingini hjá LBF.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í kostnaðarmetingini frá LBF P/f, har nevndi meirkostnaðir sum Articon ynskir á 2,3 mió. er íroknaður, spreingi- og arbeiðstøkutrygging, prosjektering, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í omanfyrinevnda metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 25.377.267,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 17/00971-10), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2017.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararktekturin mæla til, at lata tað standa Articon P/f í boði at halda fram við útstykkingararbeiðinum og heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um útstykkingararbeiðið, við nevndu kostnaðarmeting hjá umsitingini sum grundarlag, innanfyri samlaðan fíggjarkarm á kr. 25.377.267,- og at játtaðar verða nevndu kr. 25.377.267,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini kr. 12,7 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2017 og 2018 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, vísir á, at arbeiðið at halda fram við útstykkingini er ikki boðið út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununnar, LBF P/f, hevur tillagað og dagført útstykkingarprosjektið soleiðis, at nøgdarjavnvágin millum avgrivið (sprongt) og uppfylt tilfar gerst neyvari og tí eisini kostnaðarminni.

Articon hevur, við støði í tillagaða og dagførda útstykkingarprosjektinum og við útgangsstøði í prísvøkstri á 4,45% á eindarprísum/tilboði frá undanfarnu útstykking, har veitingar samsvara, latið kommununi ítøkiligt tilboð, dagfest 9. oktober 2017, uppá kr. 19.943.449,- u/mvg fyri gerð av útstykkingararbeiðinum.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í nevnda tilboði frá Articon, tá íroknað eru gøtuljós, spreingi- og arbeiðstøkutrygging, prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m.

Harafturat skal leggjast upp fyri einum vendiplássi á kr. 500.000 u/mvg sum ikki er greitt í tilboðnum.

Við grundarlag í omanfyrinevnda metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.944.041,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 17/00971-21), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2017.

**Tilmæli:**

Býarverkfrøðingurin og virkandi býararktekturin mæla til, at tikið verður av tilboðnum frá Articon P/f og heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um útstykkingararbeiðið, við støði í tilboðið teirra, innanfyri samlaðan fíggjarkarm á kr. 26.944.041,- og at játtaðar verða nevndu kr. 26.944.041,- til arbeiðið.

Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini kr. 13,4 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2018 og 2019 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.

Eisini verður mælt til, at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at bjóða arbeiðið út alment við undargóðkenning.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at bjóða arbeiðið út alment við undargóðkenning.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at mæla býráðnum til taka av tilboðnum frá Articon P/f áljóðandi kr. 18.943.449,00 umframt mvg. og at játtaðar verða kr. 25.400.000,- til útstykkingararbeiðið.

Mælt verður til, at helvtin av játtaðu upphæddini verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2018 og 2019, og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2018 og 2019.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 303/17 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1401a við Sundsvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 263/16 | 16/03934-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 311/16 | 16/03934-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 232/17 | 16/03934-2 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 303/17 | 16/03934-2 |

**Málslýsing:**
Magnus Hansen hevur, vegna Búrøkt, v. Kristian á Neystabø, søkt um at stykkja matr. nr. 1401a við Sundsvegin út til íbúðir (j.nr. 15/03170).

Í sambandi við eina samtykta ætlan um dagføring av Sundsvegnum, er neyðugt at kommunan ognar sær 473 $m^2$ av matr. nr. 1401a (j.nr. 2013-0268, 16/03497, 2013-2489). Hetta er neyðugt at tryggja sær í serstøku byggisamtyktini.

Ognin, sum Products from Faroes eigur, er tilsamans 13.453 $m^2$ til støddar. Í almennu byggisamtyktini er ognin lutvíst útløgd sum A1-øki, uml. 7.000 $m^2$, og lutvíst D1 frílendi, uml. 6.000 $m^2$.

Í umsóknini stendur, at ætlanin er at byggja 58 íbúðir á millum 42 og 95 $m^2$.

Í serstøku byggisamtyktini er ikki ásett hvussu útstykkingin skal skipast men bert hvat kann byggjast, byggistig og nýtslustig fyri tann partin, sum liggur í A1 í almennu byggisamtyktini (uml. 7.000 $m^2$), og at parturin sum liggur í D1 fríøki í almennu byggisamtyktini verður felags fríøki fyri útstykkingina. Harafturat verður ásett mest loyvda hædd á bygging, krav til parkeringspláss v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1401a við Sundsvegin verður góðkend av nevndini og beind víðari í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**

Í sambandi við skipan av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1401a, so er fríøkið fyri útstykkingina væl størri enn tey 10%, sum ásetingarnar eru sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, Kap III, § 1, stk. 7:
*Umframt øki til vegir, parkering, reinsiverk o.l. skal hóskandi øki upp á minst 10% av samlaðu víddini verða lagt til felagsøki herundir spælipláss, fríøkir v.m.*

Økið, sum bygt verður á, er umleið 7.000 m$^2$ til støddar, og er 10% av tí 700 m$^2$.

Ynski er at broyta serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1401a til at hava fríøki eftir vanligum fortreytum, tvs. 10% av samlaðu víddini.

Sum kortskjalið Fríøki og reinsiverk (16/03934-15) sýnir, so er fríøkið frámerkt á norðara partinum av matr. nr. 1401a. Hetta grundað á, at tað liggur tætt við viðarlund og náttúruøkið við Hoydalsá og kemur tí í einum náttúrusjónarmiði íbúgvunum til góðar.

Sum kortið eisini sýnir, so verður reinsiverkið staðsett í landsynningshornið, har lendið er lægst. Reinsiverkið er 80 m$^3$, til 60 bústaðir og er staðsett í landsynningshorni á friðaða økinum. Er sýnt á tekningini víst við reyðum liti.
Í samband við íbinding frá útstykking, kann nevnast at tað eru 2 møguleikar fyri íbinding.

1) Í verandi leiðing á trøðni sum er ø160 PVC.
- Áðrenn íbindast kann, má yvirflatuvatn skiljast frá og 2 streingja skipan leggjast fyri verandi íbindingar, grundað á at leiðingin sum er í dag ikki klárar nógv meira frárensl.
- Áðrenn nýggj 2 streingja leiðing kann leggjast, má loyvi fáast til vega frá eigarum.
- Kloakkin verður leidd í verandi pumpubrunn, Undir Svartafossi.

2) Nýggj kloakkleiðing verður løgd frá høvuðskloakkleiðing í Sortudíki til Sundsvegin.
- Loyvi má fáast til vega at leggja kloakk gjøgnum privata ogn, her eru tó fleiri møguleikar. Sí tekning Reinsiverk_Uppskot (16/03934-15).

Báðar loysnirnar eru kostnaðarmiklar. Við loysn 2 kann umgangast pumpubrunnur.

**Skjøl viðkomandi fyri ískoyti:**
Fríøki og reinsiverk (16/03934-15)
Reinsiverk_Uppskot (16/03934-15)
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á matr. nr. 1401 við Sundsvegin_tekstur (16/03934-15)

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 1401a, soleiðis at fríøkið verður lagt eftir vanligum fortreytum, har tað verður 10% av útstykkingini, sum sýnt á kortskjalinum, at reinsiverkið verður staðsett sum sýnt á kortskjalinum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 304/17 Fjósið í Hamrabøi í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 16.10.2017 | 6/17 | 17/03314-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 212/17 | 17/03314-1 |
| 3 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2017 | 8/17 | 17/03314-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 227/17 | 17/03314-1 |
| 5 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 304/17 | 17/03314-1 |

**Málslýsing:**

Í sambandi við, at kommunan keypti Hamrabø í Kollafirði, matrikul 91l, keypti kommunan eisini fjósið og lendið kring tað. Talan er um útsynningspartin av matriklinum, ið liggur uppat gamla bygdavegnum í Homrum.

Umsitingin hevur umrøtt, hvat økið og fjósið kann brúkast til. Mett verður ikki, at kommunan hevur brúk fyri ognini. Av tí at fjósið ikki er eitt prýði fyri økið verður mælt til, at fjósið verður tikið niður og lendið brúkt til bústaðarendamál, vísandi til stóra eftirspurningin eftir bústøðum í Kollafirði.

Av tí at økið er rættiliga lítið og atkomuvegur til granna ognir er á økinum, eru ávísar avbjóðingar í mun til at skipa økið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at fjósið verður tikið niður og at leggja málið um skipan av økinum fyri Byggi- og býarskipanarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 16. oktober 2017:** Staðbundna nevndin ynskir at fjósið verður tikið niður og eitt framtíðarynski er at eitt eldrasambýli verður bygt har.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur viðgjørt økið, sum fjósið stendur á, í einum býarskipanarligum sjónarmiði í sambandi við ynskið um at brúka lendið til bústaðarendamál.

Økið er fríøki í sambandi við útstykkingina á Hamrabøi, og skal serstaka byggisamtyktin broytast, um økið, sum fjósið stendur á, skal frámatrikulerast. Og tískil skal útstykkingin leggjast fyri nevnd aftur.
Umsitingin skal kanna, um útstykkingin tolir at missa fríøkið, sum fjósið stendur á.

Á økinum liggja servituttir, sum er atkomuvegur hjá grannaognum.
Matr. nr. 95, 96 og 99 eiga atgongd til og uttanum húsini (sí skjal Avrit úr tingbók 17/03314-4).
Matr. nr. 99 liggur norðanfyri útstykkingina á Hamrabøi.
Matr. nr. 91k, sum liggur fyri endan á atkomuvegnum, er ikki nevnt í skeytinum. Koyrirættur og vegatkoma skulu tí endurskoðast, soleiðis at øll kunnu eiga rætt til vegin.

**Skjøl:**
Avrit úr tingbók 17/03314-4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum í sambandi við at umskipa økið við atliti til matrikulering, vegaatkomu, broyting av byggisamtykt o.ø. til næstkomandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við at stykkið verður selt í fríari sølu og at fjósið verður tikið niður.

**Ískoyti:**
Áhugi er at keypa økið, sum fjósið stendur á og at byggja sethús á økinum. Áðrenn sølan kann fremjast, skal fjósaøkið fevnast av umráðisparti A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum bústaðarøki.

Kommunan sendir umsókn inn til Umhvørvisstovuna, har víst verður á at ætlaða broytingin er í samsvar við byggisamtykt, at byggiloyvi er ella verður givið, friðingarviðurskifti um neyðugt og atkomuviðurskifti.

Torført er hjá Umhvørvisstovuni at siga okkum, hvussu leingi viðgerðin frá teimum kann taka. Avgreiðsla kann taka frá 1-2 mánaðir til 6 mánaðir ella meir. Alt eftir um talan er um tunga viðgerð ella skjóta avgreiðslu.

Fríøkið í dag fevnir um ein veg, asfalt og atkomu til bygningarnar, og eingin dámur av einum fríøki er á økinum. Býarskipanarliga liggur hetta økið ikki sum ein partur av útstykkingini, tískil sýnast ongar avbjóðingar at taka økið, sum fjósið stendur á, úr serstøku byggisamtyktini fyri Hamrabø.

Økið, ið fjósið stendur á, er umleið 1.058 $m^2$, og verður samlaða víddin av útstykkingini á Hamrabøi eftir broyting umleið 20.904 $m^2$.
Útstykkingin á Hamrabøi tolir at missa fríøki, sum fjósið stendur á. Samlaða víddin er 21.962 $m^2$, grundstykki og vegur fylla umleið 14.800 $m^2$. Umleið 7.600 $m^2$ er restøki og er tað væl meir enn 10% av samlaðu víddini.

Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, Kap III, § 1, stk. 7:
*Umframt øki til vegir, parkering, reinsiverk o.l. skal Hóskandi øki upp á minst 10% av samlaðu víddini verða lagt til felagsøki herundir spælipláss, fríøkir v.m.*

Kortskjalið til serstøku byggisamtyktini verður broytt til ikki at fevna um fjósið, soleiðis at almenna byggisamtyktin A1 verður galdandi fyri økið, og arbeiðir umsitingin víðari við at skipa økið býarskipanarliga og leggja fram uppskot til ætlaðu matrikulering, atkomuviðurskifti, leiðingar og parkering.

Á økinum eru vegaatkoma og servituttir, ið hædd má takast fyri. Rætt er at umskipa økið soleiðis, at allir ognir á økinum fáa rætt til atkomuvegin.

**Skjøl:**
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi (áðrenn) (17/03314-2)
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Hamrabøi (Eftir broyting) (17/03314-2)

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Hamrabø til frama fyri bústaðarbygging á økinum, sum fjósið stendur á, at umsitingin arbeiðir víðari við at viðgera økið býarskipanarliga, matrikulering, atkomuviðurskiftum, parkering, leiðingar á økinum og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 305/17 Broyting av almennu byggisamtyktini við Glyvursnes frá B11 øki til 4. grundumráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 17/01044-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 305/17 | 17/01044-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tyrvingarplássið í Húsahaga verður fult um fá ár, og neyðugt er við nýggjum tyrvingarplássi. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti tann 5. februar 2007, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss, sí j.nr. 16/02171-45 Forkanningar: Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242).

Tyrvingarplássið kann koma í stríð við ætlanini um at leggja ein flogvøll á Glyvursnesi. Rambøll hevur gjørt eina lýsing av hesum, har víst verður á, at eitt tyrvingarpláss dregur djór sum fuglar til sín. Tað eru ikki ávís krøv til frástøðu millum tyrvingarpláss og flogvallir. Rambøll mælir til, at frástøðan skal vera millum 3 og 6 km, t.v.s. munandi størri enn verandi ætlan.

Ein loysn er, at tyrvingarplássið verður sett í verk nú og síðani niðurlagt, tá flogvøllurin verður tikin í nýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum ætlanin er at leggja nýggja tyrvingarplássið, liggur á umráðisparti B11 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingarnar fyri umráðispart B11, §18 eru:
*Umráðisparturin verður kannaður til grótbrot og virksemi, ið hevur samband við hetta.*
Tískil er neyðugt at broyta øki í almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu frá umráðisparti B11 til 4. grundumráði.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Staðsetingin av nýggja tyrvingarplássinum varð samtykt av býráðnum í 2007, í sambandi við forkanningar, sí j.nr. 16/02171-45 Forkanningar: Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta økið frá umráðisparti B11 til 4. Grundumráði og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Tikið av skrá.

# 306/17 Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 229/17 | 17/03802-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 306/17 | 17/03802-1 |

**Upprunin til málið:**
Í 2007 varð ætlan at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og alment fríøki, sí kortskjal av táverandi uppskoti Serstøk byggisamtykt fyri Stórutjørn (17/03802-2).

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samsvarandi við ætlan um serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn varð ætlan um broyting av almennu byggisamtyktini eisini, soleiðis at A3 økið fyri vestan og D2 økið fyri eystan varð víðkað, sí kortskjal Almenna byggisamtyktin áðrenn broyting og Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Stórutjørn (17/03802-2).

Uppskot til serstaka byggisamtyktin varð fyri býarskipanarnevndini, býráðnum (góðkent 22. juni 2007), til hoyringar frá (2-23. juli 2007) og varð send landsins myndugleikum. Umsitingin sendi Innlendismálaráðnum eitt skriv um ætlaðu broytingina við skjølum. Kommunan móttók síðani ummælisskriv frá Innlendismálaráðnum, har váttað varð um móttøku av skrivinum.

- 8. oktober 2007: Skriv varð sent Innlendismálaráðnum til góðkenningar
- 15. oktober 2007 varð skriv frá Innlendismálaráðnum um áheitan av dagførdum kortskjølum varð sent kommununi
- 30. oktober 2007: Skriv varð sent Innlendismálaráðnum við dagførdum kortskjølum.
- 8. november 2007 sendi Innlendismálaráðið kommununi váttan um móttøku
- 25. januar 2008 biður Innlendismálaráðið kommununa koma við viðmerkingum skjótast gjørligt ella skuldi málið viðgerast við teimum upplýsingum, sum vóru.
- 4. februar 2008 fer málið fyri aftur í býarskipanarnevndini, har víst verður á at øll formlig viðurskifti viðv. økisskipan og ásetingum eru í lagi. Býarkskipanarnevnd landsins metti, at málið átti at verið landsmál og mælti hon til at kommunalu myndugleikar gjørdu eina neyva samfelagsliga og búskaparliga árinskanning. Úrslitið kundi so verið viðgjørt av lokalum og møguliga landsmyndugleikum.
- 17. mars 2008 móttekur kommunan skriv frá Løgmálaráðnum, ið metir viðurskiftini um økisskipan og ásetingar vera í lagi og ætlar at góðkenna 1. byggistig.
- 28. apríl 2008 var málið fyri býarskipanarnevndini, har kunnað varð um málið; at Løgmálaráðið hevði partvís góðkent uppskotið við nøkrum viðmerkingum, sum at 1. byggistig varð góðkent.
- 12. november 2008 varð skriv um góðkenning sent Innlendismálaráðnum
- 18. november 2008 váttaði Innlendismálaráðið um móttøku
- 8. desember 2008 varð býarskipanarnevndin kunnað um málið.

Tíðarlinjan er gjørd við at leita eftir skjølum í savninum hjá Tórshavnar kommunu (mál nr. 2006-1204) og Heilsu- og Innlendismálaráðnum, sí kortskjal Tíðarlinja fyri Stórutjørn (17/03802-2).
Formella góðkenningin av serstøku byggisamtyktini er ongantíð komin, men hava partar agerað eftir, at hon hevur verið galdandi. Galdandi kortskjal og nýggjasta broytingin av serstøku byggisamtyktini var í samband við kirkjugarðin í Hoyvík (mál nr. 16/00592) og varð góðkend av Heilsu- og Innlendismálaráðnum 24. juni 2016, sí kortskjal Góðkenningarskriv um broyting av serstøku byggisamtyktini (17/03802-2).

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tað er eingin orsøk at serstaka byggisamtyktin liggur sum ein forðing fyri víðari menning og býarvøkstur av økinum og býnum, tí verður mett, at ein avtøka av serstøku byggisamtyktini er hóskandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongar viðmerkingar

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2006-1204 - Serstøk byggisamtykt Stóratjørn - broyting av byggisamtykt
16/00592 – Broyting av byggisamtykt í sambandi við nýggjan kirkjugarð í Hoyvík

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Serstøk byggisamtykt fyri Stórutjørn – tekstur 17/03802-2
Serstøk byggisamtykt fyri Stórutjørn 17/03802-2
Almenna byggisamtyktin áðrenn broyting (17/03802-2)
Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Stórutjørn (17/03802-2)
Tíðarlinja fyri Stórutjørn (17/03802-2)
Góðkenningarskriv um broyting av serstøku byggisamtyktini (17/03802-2)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Umhvørvis avleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Sosialar avleiðingar** | | | **Nei** | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, orsakað av eini ótíðarhóskandi skipan av økinum og at ætlanirnar í sambandi við byggisamtyktina eru sleptar og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 13 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

# 307/17 Bústaðarpolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 63/17 | 17/00899-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 63/17 | 17/00899-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 110/17 | 17/00899-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 141/17 | 17/00899-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 180/17 | 17/00899-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 203/17 | 17/00899-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2017 | 233/17 | 17/00899-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2017 | 240/17 | 17/00899-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 315/17 | 17/00899-1 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 307/17 | 17/00899-1 |
| 11 Tekniska nevnd | | | 17/00899-1 |

**Lýsing av málinum:**
Fólkavøkstur og flytimynstur skapa bústaðaravbjóðingar í Tórshavnar kommunu. Seinastu mongu árini hevur fólkavøkstur verið í Tórshavnar kommunu, og sær tað út til, at hendan gongdin vil halda á fram komandi árini. Flytimynstrið broytist somuleiðis støðugt, har tað vísir seg, at fólkið flytur alsamt meiri millum ymisku bútilboðini, í mun til fyrr, tá fólkið einamest ynskti at búgva í sethúsum.

Hvør er leikluturin hjá kommununi? Hvussu tryggjar kommunan nøktandi bústaðarmøguleikar í kommununi?

Ásannandi at Tórshavnar kommuna hevur tørv á einum bústaðarpolitikki, sum tekur støðu til leiklutin hjá kommununi, umframt tekur støðu til hvussu kommunan kann verða við til at tryggja nøktandi bústaðarmøguleikar í kommununi, verður málið reist í byggi- og býarskipanarnevndini til umrøðu og støðutakan um framhaldandi tilgongd.

Fyri at fara undir at gera ein bústaðarpolitikk fyri Tórshavnar kommunu verður mælt til at seta verkætlanarbólk umboðandi fyrisitingarnar. Bústaðarpolitikkurin liggur tætt upp at gerð av kommunuætlanini, og sostatt verður mett, at verkætlanarbólkurin verður umboðandi limir í verkætlanarbólkinum fyri kommunuætlanina. Alt arbeiðið í sambandi við gerð av bústaðarpolitikkinum fer til ummælis og støðutakan í byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og endaliga í býráðnum.

Fyrsta stig fyri at gera ein bústaðarpolitikk verður at savna dátur um:
1. Býarvakstrarøkir í kommununi
2. Verandi bústaðarviftu í Tórshavnar kommunu
3. Gjørdar bústaðir í kommununi seinastu árini, býtt á bústaðarslag
4. Væntaður bústaðartørvur
5. Væntaður fólkavøkstur, býtt á aldur og stødd á húskjum
6. Til- og fráflyting og innanhýsis flytingar

Síðani verður farið undir at koma við uppskotum til átøk at nøkta bústaðartørvin. Ávegis bústaðarpolitikkurin verður lagdur fyri byggi- og býarskipanarnevndina til umrøðu áðrenn summarferiuna.

Útreiðslur í samb. við gerð av bústaðarpolitikkinum verða mettar til kr. 150.000 og fíggjaðar av kt. 7315, Kommunuætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at gjørdur verður ein bústaðarpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu samsvarandi omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í tilgongdini at gera bústaðarpolitikkin hevur umsitingin savnað dátur inn, soleiðis at grundarlagið fyri at evna sjálvan bústaðarpolitikkin er nøktandi.

Endaliga dátugrundarlagið er enn ikki liðugt, men er evnað við ymsum hagtølum og framrokningum og verður lagt fyri nevndina at kjakast útfrá, soleiðis at umsitingin til næsta fund kann leggja ein endaligan bústaðarpolitikk fyri nevndina. Víst verður til viðhefta skjal '**Dátugrundarlag –Bústaðarpolitikkur fyri Tórshavnar kommunu**', j.nr. 17/00899-5.

Dátugrundarlagið lýsir:
- Býarmenning seinastu árini
- Bústaðarbygging higartil
- Væntandi fólkavøkstur
- Tey ungu
- Tey eldru
- Til- og fráflyting
- Væntandi framtíðar bústaðartørvur (her mangla framrokningar)
- Fjølbroytt fólkasamanseting
- Leiklutin hjá Tórshavnar kommunu

Uppskot um visjón handan bústaðarpolitikking er at:
*«Allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at búgva í einum góðum bústaði, í einum góðum býi við fjølbroyttari fólkasamanseting»*

Umsitingin hevur tørv á, at ymisk evnir verða umrødd. Hesi evnir eru:
a) Skal kommunan útvega bústaðir, innan hvørji økir og hvussu skal hetta gerast? Kommunan hevur í fleiri áratíggju staðið á odda fyri at veita útstykkingar av ymiskum slag, soleiðis at borgarin í kommununi hevur møguleika fyri at búseta seg. Í sambandi við gerð av bústaðarpolitikkinum er spurningurin um hvør leikluturin hjá kommununi skal vera í framtíðini, soleiðis at tørvurin á eldrabústøðum, lestrarbústøðum og annars bústøðum verður nøktaður og samstundis tryggjar fjølbroytta fólkasamanseting. Um hugt verður eftir bústaðarviftuni, so sæst at vit eru í undirskoti

av íbúðum, sum eisini vísir, at vit í dag ikki hava eina nóg breiða viftu av bústaðarsløgum.

b) Skal kommunan samstarva við ymiskar aktørar?
Tað er týdningarmikið at taka støðu til kostnaðarstøði á bústøðunum í kommununi, og hvussu kommunan kann verða við til at tryggja ein nøktandi kostnað av bústøðum í kommununi, soleiðis at fjølbroytta fólkasamansetingin verður varðveitt. Ymiskir møguleikar eru fyri at samstarva við aktørar uttanfyri kommunala økið. Sí viðheftu fílu '**Samstarv við aktørar**', j.nr. 17/00899-6, um hvussu samstarv kann fremjast við ymiskar aktørar.

c) Skal kommunan samstarva við privatar lendiseigarar?
Sum kunnugt eigur kommunan einans avmarkað lendi, og seinastu árini hevur kommunan víðkað býin við at keypa lendi frá Búnaðarstovuni. Um burðardygg bygging skal raðfestast, so verður neyðugt at kommunan raðfestir bygging innanfyri verandi bý, sum sostatt er við til at tætta um býin. Ein møguleiki at samstarva við privatar lendiseigarar um at útstykkja innanfyri verandi byggiøki, har leiðingar, infrakervið, gerandis hentleikar o.a. longur er á staðnum. Harumframt kann kommunan vera við til at vísa á og hjálpa lendiseigarum við at útstykkja og byggja í samljóð við ynskini í bústaðarpolitikkinum.

d) Hvussu skal kommunan veita lendi til bygging?
Vanligt hevur verið, at kommunan keypir lendi til útstykkingar, men skal kommunan framhaldandi gera hetta ella skal kommunan virka fyri, at lógarheimild verður framd, sum gevur kommununi rætt til at ognartaka lendi til bústaðar bygging?

e) Hvussu skal kommunan handfara burðardyggan tættleika?
Ynski er um at verandi býur eins og aðrir býir í heiminum raðfestir burðardyggan tættleika, soleiðis at kommunan verður savnað, men so sanniliga eisini fyri at minka um íløgu-, rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslur í sambandi við infrakervi, leiðingar, bussleiðina, kavarudding, gerandis hentleikar osfr. Burðardygg menning er somuleiðis varðveiting av fríøkjum, soleiðis at trivnaður í býnum er tryggjaður. Verandi byggisamtykt tryggjar, at avís fríøkir í býnum verða varðveitt, men neyðugt verður at hyggja eftir, um óbygd byggilendi kunnu verða við til at fremja burðardyggan tættleika.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin umrøður viðhefta tilfar fyri at koma til eina visjón fyri bústaðarpolitikkin og út frá dátugrundarlagnum kjakast um hesar spurningar:
a) Skal kommunan útvega bústaðir, innan hvørji økir og hvussu skal hetta gerast?
b) Skal kommunan samstarva við ymiskar aktørar?
c) Skal kommunan samstarva við privatar lendiseigarar?
d) Hvussu skal kommunan veita lendi til bygging?
Hvussu skal kommunan handfara burðardyggan tættleika?

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Málið umrøtt og samtykt at umsitingin leggur kjakupprit til bústaðarðpolitikk fyri á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Málið varð lagt fram og kjakuppritið kemur í oktober.

**Ískoyti:**
Kjakuppritið fyri Bústaðarpolitikkin er nú liðugt og verður lagt fram.

Bústaðarpolitikkurin er sprottin úr Dátugrundarlagnum fyri Bústaðarpolitikkin, sum lýsir býarmenningina higartil og fólkatals- og bústaðarframskrivingar.

Kjakuppritið lýsir:
- Støðuna í dag
- Visjón og stevnumið
- Tørvsgreining og átaksætlan

Visjónin handan bústaðarpolitikkin er at:

*«Allir borgarar í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at búgva í einum tíðarhóskandi bústaði, í einum virknum høvuðsstaði við fjølbroyttari fólkasamanseting»*

og stevnumið handan politikkin eru:

*«Pláss fyri fleir - nú og í framtíðini»*

*«Fjølbroytni innan bústaðarslag, -stødd, eigaraviðurskifti og kostnaðarstigi»*

Umsitingin hevur tørv á, at byggi- og býarskipanarnevndin umrøður visjón og stevnumið handan bústaðarpolitikkin og niðanfyristandandi punktir, har greitt verður frá, hvat Tórshavnar kommuna vil viðv. bústaðarbygging, og hvussu hetta verður loyst við støði í teimum omanfyrinevndu stevnumiðum. Sí niðanfyristandandi:

**«Pláss fyri fleir – nú og í framtíðini»**

| **Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VILJA VIT:** |
|---|
| 1. Hava størri útboð av leigubústøðum |
| 2. At privatir partar gerast ein størri aktørur í leiguíbúðarbyggingini |
| 3. At tað kemur umferð í bústaðarmarknaðin |
| 4. At borgarar kunnu seta búgv í eigarabústaðir |
| 5. At ung støðast í høvuðsstaðnum |

| **HETTA LOYSA VIT VIÐ AT:** |
|---|
| 1. Kommunan samstarvar við Bústaðir um verkætlanirnar um fleiri leigubústaðir, ið eru í gerð, og arbeiðir við at betra tilgongdina til framtíðar verkætlanir. |

2. Kommunan stuðlar undir, at privatir aktørar eisini gerast partur av leigubústaðarbyggingini. Kommunan ynskir at arbeiða fyri, at privata vinnan fær líknandi treytir í mun til atgongd til kommunalt lendi sum Bústaðir, tá tað snýr seg um at byggja leigubústaðir.[3] Í hesum sambandi arbeiðir kommunan við at fáa landsmyndugleikarnar at tryggja, at lógar-grundarlagið stuðlar undir leigubústaðarbygging. Kommunan tekur við leiklutinum sum slóðari stig til at fáa privatar aktørar, so sum byggivinnuna, pensjónsfeløg og fíggingarstovnar at fara í samstarv um at byggja leigubústaðir.

3. Kommunan mælir til, at tað eisini verður bygt rørsluvinarligt, soleiðis at fólk við rørslutarni fáa bústaðir, og at eldri fáa møguleika at sleppa úr stórum sethúsum og inn í minni eldravinarligar (leigu)bústaðir, sum ikki krevja viðlíkahald. Við hesum skapa vit tøk familjuhús og virka fyri at varðveita fleiri barnafamiljur í býnum, og skapa somuleiðis smærri og meiri nøktandi bústaðir til tey eldru. Stuðulsskipan er til at byggja rørsluvinarligar leiguíbúðir.

4. Leypandi menna útstykkingarætlanir til sethúsabygging og blandaða bústaðarbygging, soleiðis at framtíðar býarøki framhaldandi gerast fjølbroytt og til ein breiðan málbólk.

5. Menna útboðið av fyribils bústaðartilboðum, t.d. leiguíbúðir, við tí fyri eyga at eggja og gera tað lættari hjá ungum at flyta til høvuðsstaðin. Harumframt at stuðla undir at fáa fleiri lestrarbústaðir, soleiðis at fleiri ung, sum hava í hyggju at flyta heimanífrá, verða verandi í kommununi.

**«Fjølbroytni innan bústaðarslag, -stødd, eigaraviðurskifti og kostnaðarstigi»**

**Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU VILJA VIT:**

1. Hava ein fjølbroyttan bústaðarmarknað

2. Arbeiða fyri eini býartætting

3. Tryggja grøna umhvørvið í og rundan um verandi og nýggj bústaðarøki

**HETTA LOYSA VIT VIÐ AT:**

1. Tryggja, at framtíðar útstykkingarætlanir í ávísan mun taka atlit at eini fjølbroyttari fólkasamanseting. Fyri at røkka hesum verður í størri mun neyðugt at virka fyri, at íbúðarbyggingin verður raðfest. Í hesi tilgongd skal serlig hædd takast fyri, at vit fáa blandaða bústaðarbygging og ikki býlingar, har ávísir samfelagsbólkar eru í meiriluta. Her skal talan tí vera um bústaðarøki, har bústaðirnir hava blandað eigaraviðurskifti og kostnaðarstøði.

2. Vísa á lendismøguleikar og tøkar bygningar í verandi býi, og seta krøv t.d. við at broyta serstøku byggisamtyktirnar fyri hesi øki, soleiðis at framtíðar bústaðarbyggingin verður tættað. Lendi inni í býnum eru sera avmarkað og kostnaðarmikil. Kommunan eigur sjálv avmarkað lendi í verandi býi, men hesi eru ikki samanhangandi og liggja oftani uppat privatum lendi (sí Mynd 11). Fyri at skapa ein burðardyggan tættleika í býnum, vil kommunan eggja privatum eigarum at byggja bústaðir, har leiðingar, infrakervi, gerandis hentleikar o.a. longu eru á staðnum. Kommunan kann vera við til at vísa á og hjálpa lendiseigarum at útstykkja og byggja í samljóð við ynskini í bústaðarpolitikkinum.

3. Skráseta og góðskumeta grønu økini í býnum, sum kunnu mennast til at gerast virkin grøn fríøki til gagns fyri trivnaðin í býnum og ikki at nýta gott dyrkilendi til bústaðarbygging. Hetta er eisini ein partur av Grønu ætlan, sum kommunan er í holt við at dagføra.

Harafturat skal støða takast til, um *Bústaðarpolitikkurin* skal leggjast út til almenna hoyring. Við eini almennari hoyring kann politikkurin gerast meiri fólksligur, og borgarar í Tórshavnar kommunu kunnu fáa eina kenslu av at vera ein partur av útinnanini av politikkinum.

Skjøl:
Bústaðarpolitikkur, journal nr. 17/00899-21

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at nevndin umrøðir visjónina fyri bústaðarpolitikkin og omanfyristandandi punktir og at taka støðu til um bústaðarpolitikkurin skal leggjast út í almenna hoyring fyri síðani at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður visjónina fyri bústaðarpolitikkin og omanfyristandandi punktir, at taka støðu til um bústaðarpolitikkurin skal leggjast út í almenna hoyring fyri síðani at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, at taka hjáløgdu kort, síðu 28, 29 og 34, úr og at umsitingin kemur aftur við einum hoyringsleisti.

**Ískoyti:**
Á seinasta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt at taka undir við omanfyristandandi tilmæli, og at hjáløgdu kort á síðu 28, 29 og 34, vórðu tikin úr skjalinum. Hetta er nú gjørt, og umsitingin er farin í holt við at kanna møguligar hoyringsleistir. Ein endaligur leistur verður at leggja fram á fyrsta fundi í komandi ári.

**Skjøl:**
*Bústaðarpolitikkur og fylgiskjøl 11. des. 2017*, journal nr. 17/00899-24

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til umrøðu av omanfyristandandi visjón, stevnumið og átaksætlan, fyri síðani at leggja bústaðarpolitikkin út til almenna hoyring fyrst í komandi ári, tá umsitingin er komin við einum hoyringsleisti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Umrøtt og fer til hoyringar.

# 308/17 Gøtan kring Havnina og fiskastykkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 175/17 | 17/02247-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 246/17 | 17/02247-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 56/17 | 17/02247-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 54/17 | 17/02247-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 306/17 | 17/02247-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 308/17 | 17/02247-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Býarskipanardeildin hevur arbeitt við eini ringrás kring Havnina. Ringrásin er eitt áleið 35 km langt gøtu- og vegasamband, sum liggur í landslagnum kring býin. Hugskotið er at leiða borgaran og ferðafólk út í náttúruna umframt at skapa søguligar og mentanarligar upplivingar á leiðini.

Ringrásin er eitt samanhangandi strekki, sum fevnir um seks styttri og longri leiðir við hvør sínum serliga eyðkenni - frá miðbýnum og niðan í fjallalendið. Ringrásin bjóðar tí náttúrupplivingar við rørslu og útsýni umframt upplivingar fram við bygdum øki, har surrandi býarlívið skilur seg týðiliga frá tí opna landslagnum. Landslagið er sermerkt við jørð, vatn og vindi, ið avgjørt setur sín dám á leiðina.

Ringrásin tillagar seg landslagið, og fylgir so vítt møguligt verandi vegum og gøtum, sum tilsamans telja 25 km av leiðini.

**Gøtan millum bý og hav**
Sum ein liður í heildarætlanini av ringrásini er uppskot at gera gøtu fram við strondini Yviri við Strond. Hugsanin er at skapa eitt samband frá Skansanum og niðan til Boðanes, har fólkið kann flyta seg burtur frá einum vegastrekki við nógvari ferðslu og tættari at náttúruni. Harafturat kann kommunan verja landslagið við at leiða fólk, hvar tey skulu ganga, hetta eisini í mun til vaksandi ferðafólkatalið.

Væl vitandi um, at hav og vindur setur sín dám á strondina, vil leiðin ikki altíð vera atkomulig, tá sjógvur skolar inn yvir. Arbeiðast skal við eini ítøkiligari ætlan, ið nemur við tilfarsval í mun til vatnføri, og hvussu sniðgivið verður við virðing fyri náttúruni.

**Fiskastykkið**
*Yviri við Strond er einasta fiskastykkið, sum eftir er í Havn. Hetta eigur at verða varðveitt og atkomuligt fyri almenningin.*

Leiðir leggja seg eftir, hvar menniskjan hevur havt ávirkan á landslagið. Hetta kemur m.a. til sjóndar í søguligum og mentanarligum slóðum. Eitt dømi um hetta er fiskastykkið Yviri við Strond, ið liggur á leiðini frá Skansanum til Boðanes. Økið varð nýtt til fiskaturking, eisini nevnt fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu.

“Helst eru tey farin at turka fisk á stykkinum yviri við Strond í seinnu helvt av 1920-árunum, ella kanska fyrst í 1930-árunum. Sostatt var virksemið hjá fyritøkuni stutt har yviri.
*Í 1934 søkti Johannes í Stórustovu um loyvi at byggja eitt pakkhús “ved Torgard anlagte Fisketørreplads har jeg tænkt mig opført midlertidig Fiskehus...” Byggiloyvið varð latið honum*

*(Th. Bygningskommision, j. no. 32/1934) V.ø.o. hava tey turkað fisk á hellu og tí steinsetta lendinum á leigutrøðni hjá Johannesi, áðrenn húsið varð bygt. Ein abbasonur Johannes í Stórustovu, Johannes Jacobsen, f. 1935, vanliga nevndur Hannis í Stórustovu, veit at siga, at húsini, sum standa í dag, har feløgini Føroya Ellisakfør og Føroyskir Radioamatørar halda til, eru tey somu húsini, sum vórðu bygd til endamálið á sinni, men eru tó umvæld seinni..."*

Sí søguliga lýsing av fiskastykkinum í skjalinum "Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu". Verandi støða á fiskastykkinum í dag, er hin sama, sum lýst verður í skjalinum, og stendur soleiðis skrivað:

*"...Uttanfyri síggjast enn sjónligu sporini eftir gamla "Bukkvald", og longur uppi er tjaldingarplássið, har fremmandir gestir halda til um summarið. Framvið fjøruna og suður móti Tórgarðstanga, har fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu er, síggjast stórir tyrvdir dungar av alskyns tilfari, asfalt, betong og yvirskotsgróti. Hetta er til lítlan sóma fyri umhvørvið harúti. Fjøran er sum øllum kunnugt friðað, og nú átti tíðin verið búgvin at rudda økið. Undir hesum dungum eru uttan iva eisini leivdir av steinsetta fiskastykkinum.*
*Á fiskastykkinum liggur antennuútbúnaður, og har hevur tað ligið leingi. Niðriundir húsinum, oman móti fjøruni, stendur onnur útgerð og rustar. Hetta átti avvarðandi kommunalu myndugleikin, sum eigur og umsitur ognina, at síggja til at fáa beint burtur..."*

*"...Sum greitt frá omanfyri átti lendið við Tórgarðstanga at verið ruddað. Tað steinsetta lendið er í støðum vorðið meira ójavnt. Tað er farið av tíðarinnar tonn. Hømilia og illgras skora seg upp millum steinarnar, brotnar fløskur liggja og sløðast..."*

Økið fevnir um 11 matriklar, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, Føroya Landsstýri og privatum eigarum.

Fyri at fara undir verkætlanina, gøtu og fiskastykkið, er neyðugt at gera avtalur við avvarðandi eigarar og leigarar og at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Leigusáttmáli er við Føroyskir Radioamatørar og Føroya Ellisakfør.

Á sumri 2017 var verkætlanin um "Tórsstien" løgd fram, sum starvsnæmingar gjørdu á býarskipanardeildini. Uppskotið er gott grundarlag at arbeiða út frá, og skal ein ítøkilig ætlan gerast, sum í høvuðsheitum fevnir um at rudda økið, gera gøtu og uppskot til skipan av fiskastykkinum og øðrum hóskandi mentanarsøguligum minnum og útsýnisstøðum á strekkinum Yviri við Strond. Mælt verður somuleiðis til at ein ítøkilig ætlan verður gjørd í stigum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við strandarlinjuni Yviri við Strond liggur í umráðispartinum D1, umframt at ein partur av økinum liggur í B6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál og tílíkt. Um at skipa gøtur í B6 skal loyvi fáast frá eigarunum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið um varðveitan av nevnda fiskastykki varð reist í 1992. Økið varð skrásett og ein ítøkilig ætlan varð gjørd um at hampa økið og harnæst at varðveita fiskastykkið. Harafturat varð mett frá einum frílendissjónarmiði, at økið av Skansanum - ella Eystfalsskeri og niðan á Boðanes – átti at fatast sum ein heild, og tí er fiskastykkið yviri á Tórgarði áhugavert og hevur sjálvsagdan søguligan týdning. Málið var fyri í mentamálanevndini í 1995, men har kom tað ikki longur.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

Økið er friðað sambært lóg um náttúrufriðing.

**Umhvørvisárin**
Mett verður ikki, at gøtan fer at hava serligt árin á umhvørvið.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Krøv frá eigarum og brúkarum av lendinum og ætlanarkostnaður.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ymisk viðurskifti framvið strond skulu gerast í samráð við mentamáladeildina.

Húsaumsitingin metir bygningin ikki vera í góðum standi, og mælir til, at bygningurin verður tikin niður.

Býarverkfrøðingurin tekur undir við ætlanini treytað av, at nýggj staðseting verður funnin til Reinhaldið til at umskipan av sópingarmaskinunum. Og atlit skulu takast til kloakkviðurskifti á staðnum.

**Skjøl:**
Fiskastykkið hjá Johannes í Stórustovu, journal nr. 17/02247-2
*Tórsstien,* journal nr. 17/02247-3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at byrja at gera ítøkiliga verkætlan og at fara í samráðingar við avvarðandi myndugleikar og eigarar umframt at játta kr. 1 mió. av íløgunum fyri 2018 til verkætlanina og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt at taka undir við ætlanini.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 309/17 Havnadalur - fríøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 176/17 | 17/02248-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 247/17 | 17/02248-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 57/17 | 17/02248-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 307/17 | 17/02248-1 |
| 5 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 309/17 | 17/02248-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
*Tey grønu økini og frílendini í kommununi verða varðveitt og náttúrufriðað.*
*Tey skulu verða meira atkomulig við høgligum lendisgøtum*
*Kommunan eigur eisini, eftir miðvísari ætlan, at planta fleiri trø og lýsa skógfriðað øki.*

Ynski er um at greina møguleikarnar í Havnardali.

Økið liggur í ovara parti av Havnardali, frá vatnbyrgingini til brúnna um Sandá við landsvegin vesturum.

Dalurin er skapaður av jøkulsísi, við mórenuheyggjum og Sandá í botninum. Vendir í út.norð og ls. Vatnbrunnurin liggur á 160 m yvir havið og brúgvin á uml. 130 m. Longd og breidd er ávikavist 2 km og 1 km. Samla vídd er uml. 2,5 mill. $m^2$. Dalurin liggur inni í landinum og er miðalhitin eini 2 stig lægri enn í býnum.

Sandá er mark millum Flatnahaga og hagarnar vestanfyri. Í Flatnahaga er størsti parturin av láglendinum lagdur út til traðir og nakað til viðarlund. Vestanfyri ánna er hagi, festijørð við vanligum seyðahaldi og nakað av veltum lendi til fóðurframleiðslu.

Viðarlundarøkið úti í Havnardali.
Tórshavnar kommuna og Skógfriðingarnevndin samstarvaðu í sjeytiárunum um at fáa til vega eitt størri samanhangandi øki til gróðurroyndir. Kommunan játtaði at lata skógarfriða eitt øki burturav Álakershaganum matr.nr. 1160a. Í 1974 varð lisið skógfriðingarbræv uppá ein part av Álakershaganum uml. 283.000 $m^{2,}$ uml. 28 ha. Økið liggur ímillum Sandvegin, Sandá, vatnbrunnin í Havnardali, og vegin frá vatnbrunninum um ruskstøðina aftur til Sandvegin.

Stika og byrja at gróðurseta varð í 1975. Seinni er velt, drenað og plantað meiri. Seinastu 5 árini eru 1,3 km av góðum lendisgøtum skipaðar. Skógrøkt landsins og Tórshavnar kommuna hava staðið fyri arbeiðinum.
Økið verður dúgliga vitjað, og góðveðursdagar er fitt av fólki á staðnum, og er tað eitt ynda summarútferðarstað hjá havnarborgarum við ánna.
Í 1960'unum varð stórt vatnverk bygt innast í botninum í Havnardali. Stór grótbyrging, ið rúmar 550.000 $m^3$ av vatni. Í dag veitir vatnverkið í Havnardali uml. 25% av vatninum til býin undir vanligum umstøðum. Stór vatnleiðing er løgd oman gjøgnum dalin, og sæst farvegurin í lendinum. Ætlanir hava verið at byggja nýtt vatnreinsiverk í Havnardali í nøkur ár.

Traðir vórðu lagdar inn í Havnardali frá 1930'unum og nógv er velt. Mett verður ikki, at hetta er gott gróðrarlendi til landbúnað, gras, epli, røtur v.m.
Í 90'unum, tá fíggjarkreppan herjaði, vórðu nýggjar traðir lagdar inn. Ymist er sum tær verða nýttar, veltur eru sjáldsamar at síggja. Flestu verða nýttar til seyðahald og ross. Traðirnar eru uml. 1 ha (10.000 m $^2$) til víddar í miðal.

Ruskstøðin í Havnardali var nærmasti granni til viðarlundina. Tá ruskstøðin varð tikin niður, varð økið breitt við mold og avgrevstri, og er í dag grasgrógvið. Hetta hevur stundum verið umrøtt í fjølmiðlunum, tí leivdir av ruski og rustvatni hava misprýtt. Nakað av hesum er nú hampað, og veitargrevstur grivin at forða vatni at seta undir dungan. Umhvørvisstovan hevur gjørt kanningar, ið vísa dálkingarstøðuna í nærumhvørvinum.

Ríðingarfeløgini halda til í niðasta parti av dalinum eystan fyri Sandá. Har er eisini virksemi við barnaansing, skótavirksemi og entreprenørplássi, ið er stórt lýti fyri økið.

Góðar lendisgøtur eru gjørdar fram við Sandá og gjøgnum Flatnahaga.

Velbastaðmegin er stórur mold- og avgrevstrardungi, ætlaður at slætta til graslendi. Misprýðir í lendinum.

Nakrar forðingar og bindingar til ynski um at planta og skógfriða, er verandi nýtsla av lendinum. Havnamegin er meginparturin av lendinum traðir og vestanfyri eru hagar og seyðahald.

Vatnverkið og drekkavatnsinnvinning setir avmarkingar at nýta lendið, ið veitir vatnið til byrgingina.

Vegurin út í dalin er í vánaligum standi, tí undirlendið er ov bleytt.
Ymisk onnur áhugamál hava verið frammi um venjingarkoyribreyt, motorcross o.a.

Landslagsgreiningar eru í fleiri førum gjørdar av lesandi landslagsfrøðingum, og kunna hesar nýtast til at finna øki at gróðurseta í framtíðini.

Í 2017 varð serligt øki stikað inni, at taka ímóti ridluskriðamold.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Náttúrufriðing, fráleiki til áir, ið eru breiðari enn 4 m, og til viðarlundir

Skógfriðingarlógin

Fornfriðingarlóg, leivd eftir siðsøgu, rættir og kráir

Umhvørvisverndarlóg, dálkingarstøðan í Sandá v.m.ruskstøðin, Innflyting av plantum

Hagalógin, ognarviðurskifti og Matrikullógin,Búnaðarstovan Búnaðargrunnurin eigari av lendi

**Upplýsingar frá umsitingini**
Nýtt reinsiverk hevur verið í umbúnað í nøkur ár. Einki ítøkiligt sambært býarverkfrøðinginum.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við at tyrva gamla dungan har brennistøðin stóð eftir ávísing frá Umhvørvisstovuni, og at fáa ruddað entreprenørplássið við ríðifjósini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Jarðar- og traðarbrúkið í dalinum.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

Byggisamtyktin fyri økið,  D1 og 4. grundumráði.

**Umhvørvisárin stig 3-4**
Dálkingarstøðan í Sandá av yvirtaðing v.m. á traðum og avfall frá alistøðini hjá Føroya Sílaveiðifelag

**Fíggjarlig viðurskifti**
500.000 kr. til tiltaksætlan (dispositiónsætlan), at fíggja á løguætlan fyri 2018

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Verður sent øðrum deildum til viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Verður sent til mynguleikaviðgerð

**Skjøl:**
Havnardalur_Yvirlitskort, journal nr. 17/02248-2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og  virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at gera skipanarætlan fyri Havnardal, við atliti at skógarfriðing, gróðurseting, atkomuviðurskiftum og frítíðarupplivingum, og at játta kr. 500.000 av íløgunum fyri 2018 til ætlanargerð, umframt at senda málið til ummælis í mentamálanevndini og teknisku nevnd fyri síðani at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Tikið verður undir við byggi- og býarskipananevndini.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Peningur er tøkur á íløgukonto 6275 Fríðkan av kommununi.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, mentamálanevndini og teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

## 310/17 Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 43/17 | 17/02864-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 50/17 | 17/02864-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 237/17 | 17/02864-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 250/17 | 17/02864-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 281/17 | 17/02864-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 310/17 | 17/02864-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur kannað møguleikar at betra um atkomuviðurskiftini millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Umsitingin hevur biðið verandi arbeiðstakara á staðnum, Articon, um tilboð at gera veg millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Umsitingin hevur verið í samráð við Articon til tess at finna sparingar á tilboðið. Tá ið sparingar eru framdar, er tilboðið frá Articon áljóðandi 880.000 kr.

Verkætlanin Skúlin á Fløtum skal burturbeina 1000 $m^3$ av mold í Húsahaga. Móttøkugaldið og burturkoyringin kostar 120.000 kr. Ístaðin fyri at beina moldina burtur í Húsahaga, er møguleiki at spara móttøkugjald og frástøðu í burturkoyring, um moldin verður flutt rundanum vegin millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Møguleiki er, at verkætlanin Skúlin á Fløtum flytur 80.000 kr. til verkætlanina vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
880.000 kr. til samans.

Sum liður í eini framtíðar ætlan boðar Fjarhitafelagið frá, at tey hava ynski um at leggja fjarhitarør í vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og ítróttarhøllina á Argjahamri til tess at koma yvirum Tvættá á bíligasta hátt. Fjarhitafelagið stendur sjálvt fyri at gera og gjalda hetta arbeiðið, um tikið verður av tilboðnum hjá Articon, og arbeiðið sett í gongd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum hjá Articon á 880.000 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 880.000,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur aftur verið í samráð við Articon til tess at fáa gøtuljós við í tilboðið, sí tilboð og málslýsing. Endaliga tilboðið frá Articon er áljóðandi 992.360 kr. Articon vátta, at tilboðið er fastur prísur og at teir standa við, at nøgdirnar í tilboðnum eru í lagi.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
992.360 kr. til samans.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av tilboðnum hjá Articon á 992.360 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 992.360,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

# 311/17 Flyting av løgujáttan - eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 06.11.2017 | 27/17 | 17/03645-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 68/17 | 17/03645-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 300/17 | 17/03645-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 223/17 | 17/03645-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.11.2017 | 58/17 | 17/03645-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 284/17 | 17/03645-1 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 283/17 | 17/03645-1 |
| 8 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 311/17 | 17/03645-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunustýrislógini kann kommunustýrið veita eykajáttan. Umbønir um eykajáttanir verða viðgjørdar í avvarðandi nevnd, fíggjarnevndini og tvær ferðir í býráðnum. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Avlop er á fleri verkætlanum og aðrar eru ikki farnar í gongd. Ætlanin er at flyta játtanina til aðrar verkætlanir við eykajáttan. Í sambandi við lidnar verkætlanir, verða hesar lagdar fyri avvarðandi nevnd, fíggjarnevndina og býráðið til kunnningar í næstum.

Uppskot til flyting av játtan:

| Deild | Projekt | J. Nr. | Navn | Flytast á | Flytast av | Nevnd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7175 | L00001 | | Tyrvingarpláss | 1.000 | | Náttúru- og umhvørvisnevndin |
| 8175 | L81018 | 14/03118 | Vegir Marknagil | 5.500 | | Tekniska nevnd |
| 8175 | L00001 | | Vegir | 1.663 | | Tekniska nevnd |
| | L00001 | | Alment WC í Kollafirði | 300 | | Tekniska nevnd |
| 8375 | L00001 | | Rakstrargøgn | 3.000 | | Tekniska nevnd |
| | | | **Íalt** | **11.463** | | |
| | | | | | | |
| 2775 | L27007 | 15/04903 | Innrætta heilsuhús í realskúlanum | | 41 | Eldranevndin |
| 3175 | L00002 | | Barnaansing framfluttur karmur | | 149 | Mentamálanevndin |
| 3175 | L31005 | 14/03251 | Dagstovnur í Kollafirði | | 644 | Mentamálanevndin |
| 4175 | L00002-4175 | | Umvæling Eysturskúlin, framfluttur karmur | | 1.783 | Mentamálanevndin |
| 5175 | L00002-5175 | | Framfluttur | | 43 | Mentamálanevndin |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | karmur (løgur muskikskúli) | | | |
| 6275 | L00002-6275 | | Fríðkan av kommununi, framfluttur karmur | | 1.084 | Byggi- og býarskipanarnevndin |
| 6375 | L62026 | 15/03279 | Fríøkið millum gamla telefonhúsið og Eik Banka | | 147 | Byggi- og býarskipanarnevndin |
| 6775 | L67001 | 2008-1341 | Vatnbyrging í Kollafirði | | 1.000 | Tekniska nevnd |
| 6875 | L68020 | 2013-0565 | Kloakkir í Syðra- og Norðadali | | 23 | Tekniska nevnd |
| 6875 | L68025 | 15/03746 | Dagføring av kloakk við Tjarnarlág | | 56 | Tekniska nevnd |
| 6875 | L68026 | 15/03745 | Dagføring av kloakk í Líðunum | | 140 | Tekniska nevnd |
| 6875 | L68027 | 15/03637 | Kloakk á Signabø | | 30 | Tekniska nevnd |
| 7175 | L71001/L00002 | 2007-1213 | Tyrvingarplássið á Glyvursnesi | | 926 | Náttúru- og umhvørvisnevndin |
| 7175 | L71006 | 14/01624 | Útskifting av skottpressu | | 68 | Náttúru- og umhvørvisnevndin |
| 7476 | L00002 | | Framfluttur karmur (løgur smábátahavnir) | | 74 | Vinnunevndin |
| 8175 | L00001 | | Vegir løgukarmur 2017 | | 2.000 | Tekniska nevnd |
| 8175 | L81003 | 14/00090 | Brúgv um Sandá | | 3.000 | Tekniska nevnd |
| 8175 | L81029 | 15/04352 | Knýta Traðabrekku í Hoyvíksvegin | | 255 | Tekniska nevnd |
| | | | **Íalt** | | **11.463** | |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Mælt verður nevndunum til, at taka støðu til fyriliggjandi uppskot til flyting av løgujáttan.

**Eldranevndin 06. november 2017:** Samtykt at flyta avlopið av kontu 2775 L27007.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. november 2017:** Samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini, teknisku nevnd, mentamálanevndini, byggi- og býarskipanarnevndini og náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>14. desember 2017 | Blað nr.: 80<br>Formansins merki: |

# 312/17 Eykajáttan konto 8375 rakstrargøgn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 285/17 | 17/03726-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 284/17 | 17/03726-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 312/17 | 17/03726-1 |

**Upprunin til málið:**
Viðvíkjandi trot á konto 8375:
8375 rakstrargøgn fíggjar keyp av maskinum við einum virði omanfyri 500 t.kr.

Nógv av amboðunum, ið keypt verða eru rættuliga kostnaðarmikil, og verða tískil deild yvir 2 fíggjarár, hettar hendi eisini í 2016, tá avgjørt var, at keypa eina nýggja feiðumaskinu, hon kostaði uml. 1,7 mió. kr.. Ein mió. kr. var tøk og restin skuldi koma í 2017, tá maskinan bleiv levera, men peningur varð ikki játtaður í 2017. Orsakað av hesum er eitt hall í ár á 750 t.kr. Konta 8311 er til keyp av rakstrargøgnum undir 500 t.kr. Hendan kontan fer at hava eitt avlop í ár, sum kann fíggja undirskotið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin av verkstaðnum mæla til at flyta 750 t.kr. av rakstrar konto 8311 á løgukonto 8375 rakstrargøgn.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 313/17 Lýsing eftir fyrisitingarstjóra til Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 281/17 | 17/03698-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 319/17 | 17/03698-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | | | 17/03698-1 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 313/17 | 17/03698-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Miðfyrisitingarstjóri til Tórshavnar kommunu**

Í starvsfólkareglugerðini hjá Tórshavnar kommunu, sambært § 5, stk. 4 er heimildin til at seta stjóra ásett soleiðis:
*"1.1 Stjórar og deildarleiðarar*
*Lýsingin skal leggjast fyri fíggjarnevndina til góðkenningar. Lýsingin eftir stjórum skal eisini góðkennast av býráðnum"*
*"2.1 Stjóri ella býráðsskrivari setast í starv*
*Býráðið setur stjóra og býráðsskrivarin aftaná innstilling frá býráðskrivaranum og setunarbólki við tilmæli frá fíggjarnevndini."*

**Kommunustjórin mælir til at fíggjarnevndin tekur undir við hesi lýsing.**

**FYRISITINGARSTJÓRI TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU**
Fyrisitingarstjórin mannar stjórnarbólkin saman við borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðarstjóranum. Fyrisitingarstjórin hevur ábyrgdina av fíggjarøkinum, kt-økinum, starvsfólkaøkinum og borgaratænastuøkinum (Snarskivuni).

HØVUÐSUPPGÁVUR
- Tryggja, at miðfyrisitingin er før fyri at veita borgarum og vinnulívi í kommununi eina dygdargóða tænastu
- Tryggja, at miðfyrisitingin veitir politisku skipanini holla ráðgeving
- Saman við hinum stjórnarlimunum tryggja, at kommunan hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- Tryggja, at leiðslubólkurin á miðfyrisitingarøkinum virkar sum ein savnað, samskipandi og strategiskt hugsandi eind
- Menna miðfyrisitingina sum eitt gott og virkið arbeiðspláss við týðiligum virðum og greiðum málum
- Saman við hinum stjórnarlimunum fyrireika og menna kommununa fakliga og fíggjarliga, soleiðis at hon kann taka við teimum avbjóðingum og uppgávum, sum eru lagdar kommununum at umsita, herundir eisini at kommunan er klár til at at taka við teimum møguleikum og fyrimunum talgilding hevur við sær.

FØRLEIKAKRØV
Umsøkjarar til starvið verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum.
Umráðandi er, at tú:
- hevur kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, ella tilsamans hevur sambærligt útbúgvingarstøði og royndir
- hevur kunnleika til og royndir frá leiðslu, fíggjarstýring og fyrisiting
- hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- hevur gott strategiskt skil
- dugir at seta greið mál og skapa úrslit
- dugir væl at raðfesta, samskipa og útdelegera
- hevur góðar samskiftisførleikar, bæði munnliga og skrivliga
- dugir væl føroyska málið í skrivt og talu
- megnar til tíðir at arbeiða undir stórum trýsti

Tann, ið sett/-ur verður skal hava kunnleika og innlit í samfelagsviðurskiftini í Føroyum í breiðum høpi. Politiskt tev er eitt krav, og royndir frá einum politiskum umhvørvi eru ein fyrimunur.

LØN OG SETANARTREYTIR
Starvið sum Fyrisitingarstjóri er flokkað sambært tænastumannasáttmálanum í 38. flokki, uttan at vera tænastumannasterv. Stjórasáttmáli verður gjørdur. Møguleiki er fyri áramálssetan.

MEIRA AT VITA
Ynskir tú fleiri upplýsingar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóra, á tel 280909 ella við t-posti á bjorgfrid@torshavn.fo.

UMSÓKN
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, lívsgongdarlýsing og møguligar tilvísingar skulu sendast til: torshavn@torshavn.fo. Viðmerk á umsóknina: „Miðfyrisitingarstjóri".

Umsóknir til starvið skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi

Mælt verður til at setanarbólkurin er mannaður av:

2 umboð fyri fíggjarnevndina
Bjørgfríð Ludvig, Kommunustjóra
Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra
Magnus Dam, løgfrøðingi

**Fíggjarnevndin 15. november 2017: Útsett.**

**Ískoytið:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017: Útsett.**

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Tikið av skrá.

# 314/17 Setan av tekniskum stjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 320/17 | 17/04135-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.12.2017 | 328/17 | 17/04135-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 314/17 | 17/04135-1 |

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017: Starvslýsing verður send til góðkenningar hjá fíggjarnevndini og løgd fyri býráðið.**

**Fíggjarnevndin 14. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til starvslýsing og uppskotinum til setanarbólk, j.nr. 17/04135-3, við hesi broyting:

Teksturin: ”hevur grundleggjandi innlit í at reka og menna kommunalu uppgávurnar innan fakøkini bygging, býarskipan, umhvørvi og infrakervi” verður broyttur til:

”hevur grundleggjandi innlit í at reka og menna kommunalu uppgávurnar innan fakøkini bygging, býarskipan, umhvørvi, infrakervi, lendisnýtsla og frílendi”.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til starvslýsing við teirri broyting, at setanarbólkurin verður mannaður við allari fíggjarnevndini, kommunustjóranum, umframt einum umboði við kunnleika til setanarviðurskifti.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

# 315/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 124/17 | 17/00303-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 151/17 | 17/00303-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 146/17 | 17/00303-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 187/17 | 17/00303-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 182/17 | 17/00303-1 |
| 12 Býráðsfundur | 07.09.2017 | 200/17 | 17/00303-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 212/17 | 17/00303-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 228/17 | 17/00303-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 249/17 | 17/00303-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 287/17 | 17/00303-1 |
| 17 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 287/17 | 17/00303-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 311/17 | 17/00303-1 |
| 19 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 315/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Tikið av skrá.
Ískoyti: Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Roknskapurin fyri juli framlagdur og góðkendur.

**Býráðsfundur 07. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai, juni og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 316/17 Umsókn frá B36 um íløgustuðul til tribunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 323/17 | 17/03470-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.12.2017 | 341/17 | 17/03470-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 325/17 | 17/03470-2 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 316/17 | 17/03470-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá B36 20.10.2017.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Bóltfelagið B36 søkir um stuðul til at umvæla umvæla pallin við áskoðaraplássum við B36-húsið. Sambært kostnaðarmeting verður samlaði kostnaðurin fyri tilfar og arbeiðstíð 309.540,00 kr u/mvg.
Talan er um lekar og konstruktiónsfeilir, sum, um teir ikki verða umvældir, verða enn meira oyðileggjandi fyri bygningin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta sambært leiðreglunum 30% av kostnaðarmetingini av kontu 5370 Stuðul til íløgur, og at húsaumsitingin skal góðkenna arbeiðið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. desember 2017**: Samtykt at veita stuðul kr. 300.000,00 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Ískoyti:**
Mentamálanevndin samtykti á fundi 11. desember 20017 at játta kr. 300.000 í stuðli av kontu 5370 stuðul til íløgur.

Í málslýsingini er upphædd nevnd uttan mvg. B36 søkti um kr. 386.925,00 v/mvg.

Mentamálanevndin hevur um tpost d.d. tikið undir við at broyta samtyktina soleiðis, at játtað verður kr. 406.562,50 í stuðli av kontu 5370. Sambært játtanarreglunum skal stuðul hægri enn kr. 300.000 samtykjast av fíggjarnevnd og býráðið eftir tilmæli frá mentamálanevndini.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevnidni og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða B36 kr. 386.925,00 v/mvg, ið samsvarar við upphæddina, ið B36 søkti um.

# 317/17 Umsókn frá HB um íløgustuðul til tribunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 322/17 | 17/03653-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.12.2017 | 340/17 | 17/03653-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 326/17 | 17/03653-2 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 317/17 | 17/03653-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Havnar Bóltfelag 02.11.2017

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Havnar Bóltfelag søkir um stuðul til at umvæla pallin við áskoðaraplássum við HB-húsið.
Sambært tilboði frá múraravirki 02.11.2017 verður samlaði kostnaðurin kr. 325.250,00 uttan mvg.
Talan er um lekar og konstruktiónsfeilir, sum, um teir ikki verða umvældir, verða enn meira oyðileggjandi fyri bygningin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur fyri at veita stuðul av kontu 5370 Stuðul til íløgur, samtyktar av mentamálanevndini 03.09.2015.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta sambært leiðreglunum 30% av kostnaðarmetingini av kontu 5370 Stuðul til íløgur, og at húsaumsitingin skal góðkenna arbeiðið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. desember 2017:** Samtykt at veita stuðul kr. 300.000,00 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Ískoyti:**
Mentamálanevndin samtykti á fundi 11. desember 20017 at játta kr. 300.000 í stuðli av kontu 5370 stuðul til íløgur.

Í málslýsingini er upphædd nevnd uttan mvg. HB søkti um kr. 406.562,50 v/mvg.

Mentamálanevndin hevur um tpost d.d. tikið undir við at broyta samtyktina soleiðis, at játtað verður kr. 406.562,50 í stuðli av kontu 5370. Sambært játtanarreglunum skal stuðul hægri enn kr. 300.000 samtykjast av fíggjarnevnd og býráðið eftir tilmæli frá mentamálanevndini.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

# 318/17 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 48/17 | 17/03122-25 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2017 | 65/17 | 17/03122-25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.12.2017 | 329/17 | 17/03122-25 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 318/17 | 17/03122-25 |

**Málslýsing:**
Umsitingarnar hjá IRF og Tórshavnar kommunu hava síðani tíðlíga í summar arbeitt við at kanna møguleikan fyri at samstarva um tyrvingarpláss. IRF hevur fyri stuttari tíð síðani tikið í nýtslu eitt nýtt tyrvingarpláss í Trøllavík í Suðuroy, sum IRF ætlaði at nýta til at tyrva óbrennbært burturkast, undantikið øsku, á frá øllum IRF økinum. Í fyrstu atløgu var talan um at at nýta hetta plássið til tyrviburturkast úr Tórshavn eisini, men tað varð skjótt greitt, at samlaðu nøgdirnar vórðu ov stórar til at tað loysti seg at flyta tær suður um fjørð.

IRF fór tí at kanna møguleikan fyri at leggja tyrvingarpláss norðanfjørðs. Eitt uppskot er Junkarahagan í Kvívik, har tyrvingarpláss hevur verið í mong ár, men sum er um at verða avriggað. Kommunala Brennistøðin hevur síðani verið við í tilgongdini í at kanna/fyrireika tyrvingarpláss í Kvívík. Nevnast skal, at formlig loyvi frá eigarum, kommunu og myndugleikum er ikki útvegað enn, men mett verður, at av tí at har hevur ligið eitt tyrvingarpláss í mong ár, verður lutfalsliga einfalt at fáa neyðugt loyvir á hesum stað.

Plássið skal eftir ætlan ikki nýtast til mold og annan reinan avgrevstur, tí tílíkt virksemi liggur hjá hvørjari einstakari kommunu og ikki hjá IRF. Sostatt verður framhaldandi neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at hava pláss til mold og avgrevstur, tí hetta er krav sambært lóg.

IRF hevur heitt á PB Consult um at gera tekniskar fyrireikingar, t.e. byggiprogramm, projektuppskot og kostnaðarmeting.

Seinasta kostnaðarmetingin dagfest 18/8-17 er áljóðandi 46,2 mió. Men síðani eru ymsar tillagingar gjørdar í innrættingini, sum væntandi viðføra ein minni kostnað.

Tosað hevur verið um eitt samstarvsmodell, har IRF stendur fyri at byggja og reka tyrvingarplássið, og at Tórshavnar kommuna ger nýtslu av plássinum til alt sítt tyrviburturkast, og eisini ávísir hetta tyrvingarplássið til tað vinnuliga tyrviburturkastið. Alt tyrviburturkast, sum kemur til tyrvingarplássið, verður gjaldsskyldugt, og rindað verður ein ávísur kostnaður pr. rúmmetur, soleiðis at allur íløgu- og rakstrarkostnaður verður goldin við gjøldum fyri burturkast, sum kemur til plássið. Tó verður helst eisini neyðugt, at báðir partar, t.e. IRF og Tórshavnar kommuna, veðhalda fyri hvør sínum parti av lántøkuni og rakstrinum, um tað skuldi hent, at inntøkurnar svíkja t.d. vegna fallandi nøgdir.

Sambært leysligum útrokningum kann móttøkugjaldið verða umleið 350-400 kr/m$^3$ fyri at raksturin kann javnviga. Gjaldið fyri vanligt tyrvingarburturkast er í dag 240 kr/m$^3$ í Tórshavnar kommunu.

Fyri Tórshavnar kommunu fer tað sambært leysligum útrokningum at merkja ein meirkostnað á umleið 3 mió. kr. um árið til gjøld og flutning at nýta hesa skipan við felags tyrvingarplássi saman við IRF í Kvívík, í mun til kostnaðin av verandi skipan í dag við tyrvingarplássi í Húsahaganum. Tá eru møguligar sparingar av minni virksemi í Húsahaganum innroknaðar.

Fyri vinnuna verður meirkostnaðurin til gjøld og flutning samsvarandi mettur til 1 mió. kr. um árið í mun til verandi skipan í dag. Nevnast skal, at um Tórshavnar kommuna hevði valt at bygt eitt nýtt tyrvingarpláss í Tórshavnar kommunu, hevði tað eisini viðført øktar kostnaðir og gjøld, um íløgan skuldi verið afturgoldin við gjøldum fyri burturkast.

Í sambandi við samstarvið um felags tyrvingarpláss, hevur IRF spurt Kommunalu Brennistøðina, um møguleikan fyri at IRF tyrvir ilsku á tyrvingarplássinum hjá Tórshavnar kommunu í Húsahaganum frá umleið 1. oktober 2017 og fram til eitt nýtt tyrvingarpláss er klárt. IRF skal hava avriggað sítt verandi tyrvingarpláss í Oyndarfirði á heysti 2017. Tyrvingarplássið í Húsahaganum er sum kunnugt um at verða fult, men nakað av plássi er eftir til ilsku. Eisini er gjørd eitt skipanaruppskot/neyðplan (mál nr. 16/02610) fyri hvussu tyrvingin kann umskipast, um/tá verandi pláss verður fult, og er hendan ætlan góðkend av Umhvørvistovuni. Umskipanin er mett at kosta umleið 1 mió. kr. Alternativt ber til at leggja ilskuna í eina rúgvu við økið innanfyri rulluportrið, har rúgvan við reinari sølumold liggur, og síðani koyra ilskuna norð á eitt nýtt tyrvingarpláss t.d. í Kvívík, tá ið tað økið er klárt at nýta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at

1. Tórshavnar kommuna fer í samstarv við IRF um felags tyrvingarpláss t.d. í Kvívík og at umsitingin/Kommunala Brennistøðin arbeiðir víðari við fyrireikingunum saman við IRF.
2. Tórshavnar kommuna útvegar og avsetur nýtt øki til mold og avgrevstur vestanfyri/sunnanfyri Oyggjarvegin við Kleynisvarða
3. Tórshavnar kommuna tekur ímóti ilsku frá IRF á tyrvingarplássinum í Húsahaganum sambært nærri avtalu við IRF.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Málið umrøtt og verður tikið uppaftur á næsta fundi við atliti til at fáa málið betri lýst.

**Ískoyti:**
Umsitingin arbeiðir við at fáa málið betri lýst, og verður hetta lagt fram á fundinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka ikki støðu til málið á fyriliggjandi grundarlag, tí málið er ikki nóg væl lýst.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

## 319/17 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 191/15 | 15/01465-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 155/15 | 15/01465-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 264/15 | 15/01465-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 24/16 | 15/01465-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 41/16 | 15/01465-2 |
| 10 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 13/16 | 15/01465-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.04.2016 | 153/16 | 15/01465-2 |
| 12 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 102/16 | 15/01465-2 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 136/16 | 15/01465-2 |
| 14 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 313/17 | 15/01465-2 |
| 15 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 319/17 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m² til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.

Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

Onnur formlig viðurskifti:
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Endalig avkláring uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur, sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 m² i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti.**
Greitt verður frá málinum. Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:** Tórshavnar kommuna og Bústaðir eru komin ásamt um treytirnar í einari rammuavtalu fyri verkætlanina at gera Kommunuskúlan til lestrarbústaðir, ið verður løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið at góðkenna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskot til rammuavtalu, j.nr. 15/01465-16 og 15/01465-17.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og játta kr. 400.000 kr av konto 1313 visandi til § 8 í rammuavtaluni og mæla býráðnum til at góðkenna rammuavtaluna.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen,  Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jákup Dam

**Ískoyti:**
Kunning um verkætlanina
Vísandi til áður samtykta rammuavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir, varð verkætlanin at høvuðsumvæla verandi Tórshavnar Kommunuskúla til lestraríbúðir v.m. bjóðað út millum tveir høvuðsarbeiðstakarar. Tilboð komu inn 16. mars 2016. Tilboðini uppá handverkaraútreiðslur uttan mvg vórðu:

| | |
|---|---|
| Eysturlon Sp/f | 54.849.240,00 kr. |
| Húsavarðatænastan Sp/f | 45.735.753,00 kr. |

Ikki bara prísurin hevði týdning, men dømast skuldi eftir fleiri kriterium. Ein verkætlanarbólkur av fólki frá TK, Bústaðir og ráðgevum gjørdi eina innanhýsis meting/døming av innkomna tilfarinum, har komið varð fram til, at Húsavarðatænastan (HVT) hevði eitt betri samlað tilboð. Hesi boðini vórðu givin arbeiðstakarum 22.03.2016. Eftir samtykki frá stýrisbólkinum fyri verkætlanina, varð farið undir samráðingar við HVT.

Samráðingarnar eru komnar á mál, og samlaði verkætlanarkostnaðurin sær nú soleiðis út :

| | | |
|---|---|---|
| Fyrireiking | Kr. | 634.854,00 |
| Arbeiðstakaraútreiðslur | Kr. | 43.516.475,40 |
| Keyp av konstruktiónsverkfr., ókendar útreiðslur og incitament | Kr. | 4.399.336,50 |
| Ráðgeving El | Kr. | 100.000,00 |
| Byggiharraútreiðslur, trygging, íbinding vm. | Kr. | 1.200.000,00 |
| Projektering, projektuppf. og fakeftirlit | Kr. | 2.982.000,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| Útreiðslur í smb. við arbeiðstakaratillutan | Kr. | 100.000,00 |
| | | |
| Í alt uttan MVG | Kr. | 52.979.290,90 |

Viðlagt er sáttmáli til partalag, organisatiónsdiagram, ráðgevaraavtala og arbeiðstakarasáttmáli saman við tíðarætlan.

Parturin av handverkaraútreiðslum hjá Tórshavnar kommunu verður at rinda klimaskermin, tó uttan altanir. Restin rindar Bústaðir.

Parturin hjá Tórshavnar Kommunu við øllum er:

| | | |
|---|---|---|
| Handverkaraútreiðslur og byggiplássútreiðslur | Kr. | 12.841.212,00 |
| Ókent og Incitament (33%) | Kr. | 1.354.761,00 |
| Ráðgeving (33%) | Kr. | 984.060,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| | | |
| Tilsamans | Kr. | 15.520.658,00 |
| Mvg kostnaður tils., verkætlanarleiðsla ikki íroknað | Kr. | 608.127,00 |
| TK, tilsamans við Mvg | Kr. | 16.128.785,00 |

Útyvir hetta, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.

Sambært rammuavtalu skal TK skeyta Bústaði ognina matr. 339 Tórshavn, burtursæð frá vonginum móti Tróndargøtu, sum er fimleikahøll og rúm tilknýtt fimleikahøll.
Viðlagt er uppskot til skeyti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.
Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin niðurlagdur.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.

Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

Í restandi 3.974.000 mió. kr. verður fíggja soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Framfluttur løgukarmur, Glyvursvegur við Brúgv | 415.000 |
| 5775 | Framfluttur løgukarmur, Golfvøllur | 400.000 |
| 5775 | L54016, Golfvøllur | 680.000 |
| 7175 | Framfluttur løgukarmur, Tyrvingarpláss | 2.479.000 |

Hædd verður tikið fyri játtanini til tyrvingarpláss í fíggjarætlanini fyri 2017.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin uppafturtikin.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Viðm. frá Tjóðveldi: Vegna mátan at fíggja kommunala partin av meirinntøkunum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Av tí at Bústaðir koma at standa sum eigarar av komandi matrikli, eisini sonevnda listatorninum, ið kommunan fer at reka, er neyðugt at gera brúksavtalu við Bústaðir um, hvussu samstarvið best verður skipað og gjøld í hesum sambandi.

Av tí at Bústaðir formliga eigur ognina og ger nyttu av størstapartinum av henni er best, at Bústaðir tekur sær av og rindar fyri viðlíkahald av høvuðskonstruktiónini o.t., so sum HVS og

klimaskermi. Hetta merkir m.a., at um tak, vindeygu ella onnur brek vera, eisini í listatorninum, so tekur Bústaðir sær av og rindar fyri umvælingarnar soleiðis, at kommunan er leys av møguligum óvæntaðum útreiðslum eisini frammi í tíðini.

Hinvegin tekur kommunan sær av øllum innanveggja viðlíkahaldi o.t. av teim hølum, ið kommunan ræður yvir í torninum.

Tingingar hava verið við Bústaðir um hesi viðurskifti. Uppskot til avtalu er í málinum (dokument 32), har m.a. ásett er, at kommunan rindar 13.000 kr./mánaðin til Bústaðir fyri at tryggja at omanfyristandandi verður framt og fyri at tryggja bygningin. Kommunan kemur at taka sær av at halda uttanumøki og ítøkilig avtala skal gerast um vanligan rakstur, m.a. viðvíkjandi reinhaldi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla til, at góðkenna uppskoti til avtalu.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bergun Kass og Gunvør Balle, Annfinn Brekkstein, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddu: Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson.

# 320/17 Heimild til at reisa verjumál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.12.2017 | 32/17 | 17/04063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 320/17 | 17/04063-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur er á at flyta heimild í mun til verjumál.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í heilsu- og umsorganartænastuni kunnu vera brúkarar, sum hava brúk fyri verju samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál.

Tørvurin á verjumáli kann eitt nú vera tann, at viðkomandi borgari ikki megnar at taka sær av sínum fíggjarligu viðurskiftum. Vanliga er tað tá avvarðandi, sum røkja hesa uppgávu. Tó kemur tað fyri, at borgarin ongi avvarðandi hevur, sum kunnu røkja hesa uppgávuna. Hetta gevur fleiri trupulleikar, tí viðkomandi kann ikki gjalda fyri heilivág, búpláss og aðrar neyðugar tænastur og veitingar.

Tá so er, hevur Almannaverkið fingið til vega verju til hesar borgarar umvegis Ríkisumboðið. Nú eldraøkið er lagt til kommunurnar at umsita, tekur Almannaverkið sær ikki longur av hesari uppgávuni í mun til eldri borgarar, men er tað kommunan, sum skal reisa verjumál.

Formliga er tað býráðið, sum kann heita á Ríkisumboðið um at seta í verk verjumál. Henda heimild í lógini kann tó latast víðari til fyrisitingina á avvarðandi øki. Almannamálaráðið hevur latið hesa heimild víðari til Almannaverkið og fyrisitingarstjóran har, og í praksis er tað umsitingin, sum útinnir uppgávuna.

Tað er skipað mannagongd fyri verjumál og hvørjar upplýsingar v.m., sum Ríkisumboðið skal hava til viðgerðina. Sambært Ríkisumboðnum kann ein slík viðgerð taka upp til eitt ár. Verður áheitanin og verjumál sett í verk, setir Ríkisumboðið verja til borgaran. Ríkisumboðið ber kostnaðin av verjanum.

Í løtuni er eitt ítøkiligt mál, har tørvur er hjá heilsu- og umsorganartænastuni at reisa verjumál. Hetta er fyrstu ferð, at kommunan hevur hesa støðu, síðani kommunan tók yvir eldraøkið. Mett verður tí eisini skilabest, at heimildin at heita á Ríkisumboðið um reisa verjumál verður latin víðari til fyrisitingina.

Býráðið kann lata heimildina víðari til avvarðandi fyrisiting soleiðis:

***Heimild***
*Vísasandi til lóg um verjumál frá 1. mai 2010 (anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne av værgemålsloven), flytur Tórshavnar býráð við hesum heimildina í § 16, stk. 1, nr. 5 til trivnaðarstjóran at reisa verjumál sambært §§ 5-10 í somu lóg.*

*Henda heimild er galdandi til onnur avgerð verður tikin.*

Henda heimild eigur eisini at verða tikin við í samlaðu heimildarætlanina hjá kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**§ 16.** Anmodning om værgemål eller om ændring eller ophævelse af værgemål, jf. §§ 5-10, kan fremsættes af
1) den pågældende selv,
2) dennes ægtefælle, børn, forældre, søskende eller andre blandt de nærmeste,
3) værgen eller en særlig værge,
4) bygderådet
5) byrådet eller
6) politimesteren.
7) Almannamálaráðið.

*Stk. 2.* Rigsombudsmanden kan uden anmodning behandle spørgsmål om ændring og ophævelse af værgemål, jf. § 9 og § 10, samt om værgebeskikkelse og ændring heraf.

**§ 5.** Der kan iværksættes værgemål for den, der på grund af sindssygdom, herunder svær demens, eller hæmmet psykisk udvikling eller anden form for alvorligt svækket helbred er ude af stand til at varetage sine anliggender, hvis der er behov for det.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | x | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla eldranevndini til at heita á býráðið um at geva heilsu- og umsorganartænastuni, um trivnaðarstjóran, heimild at reisa verjumál til borgarar samsvarandi ásetingunum í lóg um verjumál.

**Eldranevndin 11. desember 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Bjørg Dam | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |